# FRØÐI

Mars 1999 NR 1, 5. árg. KR. 48,00



Alivinnan er ikki bara laksur

Eitt sindur um havrætt

Fyrsta einmálsliga orðabókin á føroyskum

Máling til skip skaðar lív í sjónum

10 tey bestu tølini fyri grindadráp

# Leiðari

Í blaðnum hesuferð verður greitt frá einum nýggjum slóðbrótandi slagi av fiskaaling. Føroyingurin Ragnar Joensen luttekur í lovandi verkætlan í Danmark um, hvussu fiskaaling kann mennast við at ala dýr fiskasløg í afturlatnum virkjum við sera lítlari vatnnýtslu og nærum ongari dálking.

Herfyri ljóðaði, at Løgmaður væntar at Føroyar og Bretland í næstum semjast um markið millum londini bæði. Í greinini um havrætt greiðir Herálvur Joensen frá, hvørji rættarlig viðurskifti liggja til grund fyri ásetan av havmarki millum lond.

Tann føroyska móðurmálsorðabókin verður umrødd av 4 ummælarum, sum á ymiskan hátt hava tikið bókina til sín í yrki sínum. Við meir enn 66.000 leitorðum skilst, at føroyska málið er eins ríkt og mál í grannalondum okkara, sum vit neyvan hava dirvi at samanbera okkum við.

Heimsins reinasta hav verður ofta sagt um havið kring Føroyar. Kanningarnar hjá Mariu Dam á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni benda á, at støðan inni við land er ikki so bjørt. Eitrandi skipsmáling, sum skal fyribyrgja gróðri á skipsskrokkinum, er farin at hava árin á stranda umhvørvið, soleiðis at purpurkúvingar og aðrir sniglar i fjørðuni missa nøringarevni.

Merkisvert er, at Føroyar hava eitt tað elsta veiðuyvirlit, sum nakar veit um, við grindahagtølum aftur til 1584. Dorete Bloch borðreiðir við 10 teim bestu tølunum fyri grindadráp, har nomið m.a. verður við grindaloysi, tyfusgrindina og tann dagin 4 grindir komu sama dag.

Nýggi tátturin í Frøði hesu ferðina er spurnarteigurin, har vit heita á lesarar at senda okkum spurningar ella viðmerkingar, sum kunnu takast upp í blaðnum. Hevur tú ein spurning, viðmerking ella hugskot; send inn til ritstjórnina, merkt Frøði, J.C. Svabosgøta 14, Postboks 1295, FO-110 Tórshavn.

Tað hevur verið trupult at fáa blaðútgávuna av Frøði í fastan karm, og væntandi gongur ein tíð enn, áðrenn málið er rokkið. Orsøkin er lágt fíggjarligt bluss, ein ritstjórn við kunnleika innan nógv annað enn júst blaðútgávu, og í aðrar mátar stórt arbeiðstrýst. Fróðskaparfelagið og ritstjórnin meta tó, at tað hevur stóran týdning at vera við til at breiða út kunnleikan um gransking og granskingarúrslit í Føroyum til almenningin á løttum máli. Kanska ikki minst í hesum fullveldistíðum! Tað er ósmæðið at biðja um, men vit vilja inniliga heita á lesaran at bera yvir við óstøðugu útgávuni eina tíð afturat.

*Ritstjórnin*


Frøði verður givið út av Føroya Fróðskaparfelag.


© Føroya Fróðskaparfelag og høvundarnir. Mars 1999


Frøði er alment vísindablað, sum kemur út tvær ferðir árliga. Haldaragjaldið er kr. 84,- árliga.

Mentunargrunnur Føroya Løgtings stuðlar útgávuni fíggjarliga.

Upplag: 1200

ISSN 1395-0045


Loyvt er at endurgeva úr Frøði um víst verður til kelduna. Nýtsla av longri úrdráttum má bert fara fram eftir avtalu.


Ritstjórn
Lis Mortensen (ábyrgd)
Annika Joensen
Petur Zachariassen

Ritumboðsráð
Bogi Hansen, havfrøðingur
Arne Thorsteinsson, fornfrøðingur
Martin Næs, bókavørður
Lena Nolsøe, søgufrøðingur
Anna Maria Fosaa, plantufrøðingur
Hilmar Høgenni, búskaparfrøðingur
Finnur Johansen, verkfrøðingur


Grafisk framleiðsla og prent
Gramar og Pf. Einars Prent

Perma: Grindadráp.
Myndatakari: Dorete Bloch

Nýggir haldarar
Nýggir haldarar kunnu tekna seg hjá avgreiðsluni.

Eldri útgávur av Frøði
Eldri útgávur av Frøði fáast við at venda sær til avgreiðsluna.

Greinir til blaðið
Almennar, vísindaligar greinir kunnu sendast ritstjórnini. Skrivlig høvundaleiðbeining fæst frá avgreiðsluni.


Lýsingar til Frøði
Er áhugi fyri at lýsa í blaðnum, setið tykkum tá í samband við ritstjóran, tlf. 312306, fax 318438, e-post: frodi@sleipnir.fo

Lýsingaprísir:

| | |
|---|---|
| Heil síða: | Kr. 6.000,- |
| Hálv síða: | Kr. 3000,- |
| Triðings síða | Kr. 2000,- |


Avgreiðsla
Føroya Náttúrugripasavn
J.C. Svabosgøta 14
Postboks 1295
FO 110 Tórshavn
Tlf 31 23 06, Fax 31 84 38
e-postur: frodi@sleipnir.fo


Ritstuðlar
Fiskirannsóknarstovan
Fróðskaparsetur Føroya
Føroya Fornminnisavn
Føroya Landsbókasavn
Føroya Landsskjalasavn
Føroya Náttúrugripasavn

# FRØÐI 1/99




## Alivinnan er ikki bara laksur 4

Møguleikar eru fyri at ala nýggj fiskasløg í Føroyum við framkomnari tøkni innan alivinnu. Alingin nýtir smáar nøgdir av vatni, dálkar lítið, - og er innandura...
*Eftir Ragnar Joensen, civilverkfrøðingur í aling og fiskivinnu.*






## Eitt sindur um havrætt 8

- rætturin til náttúrutilfeingið og reglurnar um landgrunsmark.
*Eftir Herálv Joensen, løgfrøðingur og deildarstjóri á Oljumáladeildini.*





## Fyrsta einmálsliga orðabókin á føroyskum 15

Føroysk/føroysk orðabók kom út í fjør. Frøði hevur biðið fýra royndar orðabókanýtarar um teirra viðmerking til nýggju móðurmálsorðabókina.
*Ummælarar eru Katrin Næs, Anna M. Brimnes, Jógvan Isaksen og Hanus Andreassen.*





## Frøðiligur spurnarteigur 23

Hesuferð: Hví melur hjólið aftureftir?
*Hans Pauli Joensen, alisfrøðingur, svarar.*





## Máling til skip skaðar lív í sjónum 24

Purpurkúvingar gerast ófruktbarir av eitrandi skipsmáling, og vandi er fyri, at djóraslagið doyr út á støðum við nógvari dálking av TBT-ríkari skipsmáling.
*Eftir Mariu Dam, evnafrøðingur, Dr.Scient.*





## 10 tey bestu tølini fyri grindadráp 27

Tað verður tosað um grindaloysi, tær størstu grindirnar, tyfusgrindina og 4 grindir sama dag, men nær var tað nú, tað var? Tað fært tú at vita á teimum næstu síðunum. Eisini fært tú at vita nøkur miðaltøl fyri grindadráp.
*Eftir Dorete Bloch, lívfrøðingur, fil.dr.*

# Aling er ikki bara laksur

***Aling er av teimum skjótast vaksandi vinnugreinum í heiminum innan matframleiðslu. Í Føroyum er alivinnan eisini vorðin ein partur av gerandislívinum, men um Føroyar skulu taka lut í vøkstrinum, alivinnan er í, verður helst neyðugt at fara í holt við at ala onnur fiskasløg enn síl og laks. Nú ber til at ala nógv ymisk fiskasløg í afturlatnum virkjum, sum tryggja ein skjótan vøkstur, nýta smáar nøgdir av vatni og dálka nærum einki.***

*Ragnar Joensen, civilverkfrøðingur í aling og fiskivinnu*
*Danish Institute of Aquaculture Technology*
*Lergaardvej 2, 6040 Egtved, Danmark*

Alivinnan stendur í dag fyri einum týðandi parti av heimsframleiðsluni av fiskavørum. Í 1995 var samlaða framleiðslan av fiskavørum til matna 80 miljónir tons og umleið 30% komu frá alivinnuni. Í nøgd er alivinnan nærum tvífaldað frá 1990 til 1995, og hon er sostatt ein av skjótast vaksandi vinnugreinum innan matframleiðslu. Mat- og landbúnaðarfelagið undir ST (FAO) metir, at úrdrátturin av fiskivinnuni í heiminum ikki kann økjast munandi, men at alivinnan tískil hevur ógvuliga bjørt útlit fyri framman og væntandi verður úrdrátturin av alivinnu tvífaldaður aftur áðrenn ár 2010.

Í mynd 1 er heimsframleiðslan av aling býtt sundur í høvuðsbólkar. Fiskur telur umleið helmingin av samlaðu alingini, meðan hin helvtin er býtt sundur millum krabbadjór, tara og skeljadjór. Av samlaðu heimsframleiðsluni standa vatnfiskur og tari fyri 70 %, meðan laksur telur umleið 2 %. Um nøgdin verður hildin saman við virði av vørunum, sæst at krabbadjór (rækjur) og saltvatnsfiskur sum heild hava besta søluprísin.

## Aling í Føroyum

Í Føroyum er aling av laksi og sílum vorðin ein fastur partur av gerandislívinum. Framleiðslan í 1997 var 21.600 tons, og roknað verður við, at umleið 1000 fólk eru í starvi beinleiðis ella óbeinleiðis í alivinnuni. Av tí at heimsframleiðslan av laksi og sílum er vaksin skjótari enn eftirspurningurin, er henda vinna vorðin ein marginalvinna, har næstan eingin munur er millum framleiðslukostnaðin og søluprísin. Um Føroyar skulu fáa meira burtur úr stóra vøkstrinum innan aling í heiminum, verður helst neyðugt at fara í holt við at ala fiskasløg, ið kasta meira av sær, og sum marknaðurin fer at spyrja meira eftir í framtíðini.

Í Føroyum hevur verið roynt at ala onnur fiskasløg enn laks og síl, m.a. tosk, kalva og skeljar. Higartil verður bert laksafiskur vinnuframleiddur, men Fiskaaling við Áir hevur í løtuni ætlanir um at royna at ala kalva, soleiðis at hann kann alast vinnuliga eins og í Noregi, Íslandi og Skotlandi.




Mynd 1.
*Heimsframleiðslan av aling í 1995 býtt sundur í høvuðsbólkar.*

*) Diadromur fiskur er fiskur sum livir ein part av lívinum í vatni og ein part í sjógvi, t.d. laksur, síl og állur.
Tølini eru frá FAO, 1998.

### *Afturlatin alivirkir*

Tá hugsað verður um, hvørji fiskasløg kunnu alast í Føroyum, hevur mest verið hugsað um, hvørji fiskasløg trívast í føroyska veðurlagnum. Við nýggju tøknini innan alivinnuna, ber nú til at ala í sonevndum afturlatnum alivirkjum, har vatnið verður reinsað fyri spillevni og síðani leitt innaftur til fiskin. Hetta merkir eisini, at smittuvandin millum virkir verður lítil. Nærum eingin dálking stendst av hesum virkjunum, av tí at spillevni, ið ikki verða niðurbrotin undir reinsingini, verða savnað saman og nýtt sum tøð í landbúnaðinum. Tá ið at kalla sama vatnið verður hildið í virkjunum allatíðina, er ikki dýrt at hita vatnið til hitastigið, har fiskurin veksur best. Vatnreinsingin gevur so nógvan hita frá sær, at ikki er neyðugt at hita vatnið fyri at halda umleið 25 °C, eisini í vetrarmánaðum, tá hitin uttanfyri liggur langt undir frostmarkinum. Í londum har hitin um summarið liggur omanfyri 15 °C er heldur trupult at sleppa av við hitan úr alivatninum, og tá er neyðugt at gera íløgur í kølianlegg. Í javna føroyska veðurlagnum verður allarhelst ikki neyðugt at køla vatnið til fisk, sum gongur í flógvum vatni.

Tað er gjørligt at ala nærum øll fiskasløg, men tað eru langt frá øll, sum loysa seg at ala. Eyðkennið við fiskasløgum, ið eru vælegnað at ala eru serliga:

- Skjótur vøkstur
- Góður søluprísur
- Fiskurin trívist, sjálvt um hann gongur tættur

Um tað fer at loysa seg at ala fiskin í afturlatnum virkjum, er tó eitt samspæl millum tað, ið vunnið verður við at hann veksur skjótari í heitum vatni og meirkostnaðin av at gera íløgur í virkið.

Samlaða heimsframleiðslan av alifiski og rækjum, sum verður ald í stórum nøgdum, og hvørji av hesum kunnu alast í afturlatnum virkjum síggjast á talvu 1. Flestu av hesum fiskasløgum kennast ikki á okkara leiðum, og tey verða serliga ald í Asia, ið stendur fyri umleið 80 % av allari aling í heiminum. Vatnkarpi (*Cyprinidae*) verður aldur í nógv størst nøgdum, og hann verður serliga aldur í risastórum veitum í triðjaheims londum. Marknaðurin fyri, kostnaðarmeting av rakstrarútreiðslum og møguleikin at ala tey dýraru sløgini eru áhugaverd at kanna nærri. Serliga kundi verið hugt at japanska ravfiskinum (*Seriola quinqueradiata*), rækjum, álli, sjóbrasum (*Pagrus major* og *Sparus aurata*), sjóbarsi (*Lates calcarifer og Dicentrarchus labrax*), flatfiski og kanska eisini øðrum fiskasløgum, ið hava góðan prís.

## Lýsing av reinsingarstigunum til alivatn

Fyri at alifiskur skal trívast, er sera umráðandi at vatngóðskan er í lagi. Tað ber ikki til undir einum at siga, hvat er góð vatngóðska, tí ymisk fiskasløg hava ymsan tørv á vatngóðsku. Sum heild verður hugsað um: súrevni, hitastig, koldioksid, pH, mikroorganismur, ammoniak, nitrat og bitlar (partikulært materiale). Áðrenn vatnið kann endurnýtast til aling, er neyðugt at reinsa spillevni burturúr og at koyra súrevni í. Vanligu stigini tá alivatn verður reinsað eru:

1. Súrevni verður koyrt við mekaniskum luftarum ella í reinum líki
2. Bitlar verða tiknir frá undir mekaniskari reinsing. Hetta verður vanliga gjørt við sílum, stasjonerum- ella trumlusílum.
3. Koldioksid verður luftað úr vatninum undir blástri ella við mekaniskum luftarum.
4. Smáverur verða bardar niður við UV-ljósi ella osoni.
5. Lívfrøðilig filtur verða nýtt til at umskapa ammoniak til nitrat. Vatnið rennur ígjøgnum eitt kar av sandi ella smáum plastiklikamum, sum hýsa bakterium, ið liva av ammoniakki. Fyri at hesar bakteriur skulu trívast er neyðugt, at súrevni er til staðar og hesi filtur verða nevnd nitrifikatiónsfiltur.
6. Nitrat verður eisini tikið úr vatninum við lívfrøðiligum filtrum. Hesi kør hýsa bakterium, ið nýta nitrat at anda við, tá einki súrevni er til taks. Nitrat verður her umskapað til køvievni, sum síðani kann blásast úr vatninum. Hesi filtur verða nevnd denitrifikatiónsfiltur, og einasti munurin millum hesi og nitrifikatiónsfiltur er, at einki súrevni er til staðar.
7. Smáir bitlar og fosfat, sum hvørki verða tikin burtur undir mekaniskari reinsing ella brotin niður í lívfrøðiligu filtrunum, verða reinsað burtur evnafrøðiliga. Hetta verður gjørt við at koyra okkurt metalsalt í, sum bindur fosfat og smáar bitlar, soleiðis at tað fellist.
8. Vatn kann vinnast úr móruni frá sílunum og evnafrøðiligu reinsingini. Polymerar (long organisk myl) verða blandaðir í móruna fyri at binda fasta evnið saman í flokkar. Síðani verður móran koyrd ígjøgnum eina síl og vatnið endurnýtt til aling.

Øll reinsingarstigini nýtast ikki at verða tikin við í einum afturlatnum alivirkið. Hitastigið har fiskurin trívist best, tøka vatnnøgdin og møguleikin at sleppa av við spillevni gera av, hvussu nógv reinsingarstig verða nýtt. Í talvu 2 sæst, hvør vatnnýtsla krevst til állaaling, so hvørt sum fleiri reinsingarstig verða tikin við, og á mynd 4 sæst, hvussu reinsingarstigini kunnu setast saman.

| | Fiskaslag | Nøgd (1000 tons) | Søluprísur í Evropa (DKK(kg) |
|---|---|---|---|
| Fiskasløg, sum ikki verða ald í afturlatnum virkjum | Vatnkarpi | 9990 | 15 |
| | Milkfish | 358 | 12 |
| | Vatnbrasur[1] | 337 | 13 |
| | Mallur | 310 | 20 |
| | Japanskur ravfiskur[2] | 170 | 84 |
| | Áburri | 52 | 16 |
| Fiskasløg, sum kunnu alast í afturlatnum virkjum | Rækjur | 932 | 80 |
| | Tilapia | 659 | 32 |
| | Laksur | 542 | 22 |
| | Síl | 385 | 20 |
| | Sjóbrasur[3] | 106 | 48 |
| | Állur | 68 | 60 |
| | Sjóbarsi[4] | 45 | 52 |
| | Flatfiskur | 17 | 54 |

Talva 1. *Heimsframleiðslan av aling í 1995 býtt sundur í høvuðsbólkar.*

1. *Bream* á enskum
2. *Amberjack* á enskum
3. *Seabream* á enskum
4. *Seabass* á enskum




Mynd 2.
*Hetta afturlatna állavirkið hjá Danish Institute of Aquaculture Technology (DIAT) liggur miðskeiðis í Jútlandi.*

## Állaaling í Norðurevropa

Afturlatin virkir eru sprottin úr strongu umhvørviskrøvunum í vesturheiminum, sum gjørdu, at alarar máttu leita eftir nýggjum framleiðsluháttum. Í Norðurevropa hava afturlatin virkir higartil serliga verið nýtt til at ala áll, og danir eru í dag fremstu állaframleiðarar í Evropa. Állaaling í Danmark stendur í løtuni í stórum vøkstri, serliga av tí at teir eru komnir inn á stóra japanska marknaðin.

Úrtøkan av állaaling hevur verið alsamt vaksandi seinastu árini, og mynd 3 gevur eitt yvirlit yvir útreiðslurnar til állaframleiðslu. Í 1996 var framleiðslukostnaðurin av álli í miðal 50 kr./kg, meðan søluprísurin var umleið 60 kr./kg. Øll danska framleiðslan av álli er í afturlatnum virkjum, og danir hyggja í løtuni at nýggjum fiskasløgum at ala í hesum virkjum.

Eitt dømi um bygnaðin av einum nymótans afturlatnum állavirki sæst á mynd 2. Hetta er eitt virki hjá Danish Institute of Aquaculture Technology (DIAT) í Egtved í Danmark (mitt inni í Jútlandi). Virkið framleiðir umleið 300 tons av álli um árið á einum 700 m$^2$ stórum øki. Aftur at reinsingini, ið sæst á myndini, verður vatnið eisini reinsað evnafrøðiliga (sí tekstkassan), og dagligi vatntørvurin er umleið 10 tons ella umleið 1 % av samlaðu vatnnøgdini í virkinum. Ein miðalstór føroysk á (50 L/s í turki) kundi sostatt nøktað vatntørvin hjá 400 tílíkum virkjum.

Nýggja tøknin við at reinsað vatnið er á veg til Føroya. Í smoltstøðini hjá P/F Alistøðini á Bakka í Glyvradali verður vatnið reinsað so mikið at einans er neyðugt at nýta 100 tons av vatni um dagin í staðin fyri umleið 7000 tons, um eingi reinsingarstig vóru nýtt.




Mynd 3.
*Útreiðslur til állaaling*

* Undir øðrum rakstri liggja m.a. útreiðslur til súrevni, el og tryggingar.
Tølini eru úr bókini: *Perspektivplan for akvakultur i Danmark 1997.*

## Møguleikin at nýta afturlatin alivirkir í Føroyum

Afturlatin virkir kunnu so at siga liggja allastaðni, av tí at tey ikki eru tengd at stórum vatnnøgdum. Fyrimunirnir við at leggja afturlatin alivirkir í Føroyum eru, at føroyingar sum heild eru vanir at handfara fisk, og hava góðan kunnleika til marknaðin av fiskavørum. Samstundis liggja Føroyar í tí partinum av heiminum, har afturlatin virkjum verða ment skjótast. Eisini er javna veðurlagið ein fyrimunur, tí tað er lætt at halda ein javnan hita uttan at gera íløgur í kølianlegg.

Størsti vansin í Føroyum er frástøðan til marknaðin, ið kann tarna søluni. Eisini er heldur høgi byggikostnaðurin í Føroyum ein vansi fyri, at afturlatin alivirkir skuldu verið løgd her.

Møguleikin at ala í afturlatnum virkjum í Føroyum, og hvørji fiskasløg dentur skuldi verið lagdur á, hevði verið áhugaverdur at kanna betri, soleiðis at Føroyar í størri mun kunnu fáa lut í stóra vøkstrinum, alivinnan hevur í heiminum.



✓ Heimasíðan hjá Danish Institute of Aquaculture Technology: www.diat.dk.

Mynd 5.
*Fiskakør*

## Les eisini


✓ Ruth Gebauer v.m., *Oppdretts Teknologi*, Tapir Forlag, Noreg 1992.

✓ T.V.R. Pillay, *Aquaculture. Principles and Practices*, Fishing News Books, Oxford 1993.

✓ *Alivinnan – nútíð og framtíð*, Føroya Havbúnaðarfelag, Tórshavn 1994.

✓ *Perspektivplan for akvakultur i Danmark 1997*, Danmarks Fiskeriundersøgelser, Lyngby 1997

✓ Heimasíðan hjá FAO: www.fao.org/waicent/faoinfo/fishery/fishery.htm.


| Reinsingarstig | Vatntørvur *(L um dagin/tons av fiski)* |
|---|---|
| Eingin reinsing | 1.500.000 |
| Súrevni koyrt í | 450.000 |
| Mekanisk reinsing | 50.000 |
| Koltvísúrni tikið úr | 30.000 |
| Nitrifikatión | 2000 |
| Denitrifikatión | 500 |
| Evnafrøðilig reinsing | 150 |
| Vatn vunnið úr móru | 50 |

Talva 2.
*Vatntørvurin til állaaling so hvørt fleiri reinsingarstig verða tikin við.*




Mynd 4.
*Dømi um, hvussu reinsingarstigini kunnu setast saman í einum afturlatnum alivirki.*

# Eitt sindur um havrætt

## - rætturin til náttúrutilfeingið og reglurnar um landgrunsmark

*Herálvur Joensen, løgfrøðingur og deildarstjóri á Oljumáladeildini*

Tað kemur fyri, at *havrætturin* og *sjórætturin* verða blandaðir saman. Hetta er ikki løgið, tí málsevnini í hesum lærugreinunum umskarast. Stutt og einfalt kann verða sagt, at havrætturin ella *public international law of the sea* snýr seg um reglurnar, ið eru galdandi fyri lond og teirra útinnan av myndugleika á havøkjum (*maritime zones*). Sjórættur ella *private maritime law* snýr seg um flutning av góðsi, skipatrygging o.l.




*Føroyska sjó-, landgruns- og fiskiøkið verður roknað úr beinum grundlinjum kring Føroyar. Bretland hevur mótmælt beinu grundlinjunum og hevur sett sítt fiskimark uttan at rokna við teimum. Hetta sæst á føroyska/bretska fiskimarkinum, ið umskarast á leiðini millum Føroyar og Hetland. Størra umskaringin fyri sunnan stavar frá nýtslu av ymiskum grundlinjupunktum, t.d. góðtaka Føroyar ikki nakrar smáoyggjar norðan fyri Skotland.* *Kelda: Jarðfrøðisavnið*

Havrætturin er partur av altjóða rætti (*jus gentium*). Altjóða rættur er søguliga treytaður av menninigini av fullveldugum tjóðum (*nationalstatum*), sum byrjaðu at síggja dagsins ljós fyri 3 - 4 hundrað árum síðani.

Víðkanin av havøkjunum, ið eru undir løgdømi (jurisdiktión) strandalandsins, og økta gagnnýtslan av havsins tilfeingi hava ført til, at havrætturin er vorðin ein framkomin partur av altjóða rætti. Serliga ST havrættarsáttmálin frá 1982 hevur stórt tal av heilt neyvum rættarreglum. M.a. eru reglur um innara og ytra sjóøkið, sund, oyggjar og oyggjastatir, landgrunnin, búskaparøkið, setan av landgruns- og búskaparmarki, frælsa havið, altjóða havbotnin, navigatión og skráseting av skipum, fiskiveiðu, havumhvørvi, vísindaligar kanningar av havinum o.a.

Í hesi greinini er ætlanini at siga eitt sindur um, hvørji rættindi eitt strandaland hevur at gagnnýta tilfeingið á landgrunninum, greiða frá reglunum um víddina á landgrunninum og seinast at greiða frá, hvørjar reglur eru galdandi, tá landgrunsmark skal setast millum lond. Fyrst nakað um, hvussu landgrunnurin kom undir løgdømi strandalandsins.

### Landgrunnurin í altjóða rætti

Frá gamlari tíð hevur altjóða rættur góðtikið, at lond gera ein part av havinum, t.d. innastu 3 fjórðingarnar, til part av sínum territorium. Á hesum økinum, ið vanliga verður nevnt sjóøkið, eru lógir strandalandsins galdandi og verða handhevjaðar. Fremmand skip eiga tó rætt til sonevnda óskaðiliga sigling gjøgnum sjóøkið. Royndir hjá strandalondum at víðka um sjóøkið hava altíð elvt til ósemju í havrættarmálum, og serliga gomlu sjóferðslutjóðirnar hava mótmælt. Havrættarsáttmálin frá 1982 loyvir strandalondum í mesta lagi 12 fjórðinga sjóøki.

Grundað á jarðfrøðiligu læruna um landgrunnin ella meginlandsstøðið, t.e. at landøkið heldur fram undir sjónum og út til hellingina út móti djúphavinum, kunngjørdi amerikanski forsetin Harry S. Truman í september 1945 rættindi USA til náttúruríkidømið á landgrunninum út fyri amerikansku strondini. Kunngerð-

in, hvørs mál var at tryggja USA einarætt til møguligar olju- og gassgoymslur, gjørdi greitt, at náttúruríkidømið er undir amerikanskum yvirvaldsrætti og undir amerikanskum eftirliti, men legði samstundis dent á, at sjógvurin yvir landgrunninum framhaldandi var frælst hav.

Mótmæli tykjast ikki at hava verið ímóti amerikansku kunngerðini. Tvøruturímóti gjørdu aðrar tjóðir tað sama, og eftir stuttari tíð vórðu rættindi strandalanda til náttúruríkidømið á landgrunninum vorðin altjóða siðvenjurættur. Tvær orsakir eru helst til, at amerikanska atgerðin eydnaðist somikið væl: 1) USA tillutaði sær avmarkað løgdømi til at gagnnýta *náttúruríkidømið* á landgrunninum og royndi ikki at gera sjálvan landgrunnin til part av amerikanskum sjóøki ella territorium, 2) eingin gagnnýtti um tað mundið oljugoymslur á landgrunninum - og tí var tað neyvan nakar, sum hevði serliga grund til at mótmæla amerikanska stiginum.

Samanborið við royndirnar hjá strandalondum at ogna sær rættin til fiskin á heimagrunnunum, kann ein undrast á, hvussu væl alt lagaði seg. Orsøkin er tann, at tá einstøk strandalond, t.d. Ísland, byrjaðu at flyta fiskimarkið út, vóru tað onnur, t.d. Bretland, sum mótmæltu, tí teirra fiskifør í mong ár høvdu roynt á grunnunum, ið nú komu undir løgdømi strandalandsins. Neyvan gagnaði tað heldur víðkanini av



*Tá hugt verður at einum havbotnskorti er skilligt, at jarðfrøðiligt samband er millum Føroyar og Rockall háslættan.*



*Myndin sýnir føroyska landgrunsøkið, soleiðis sum tað er lýst í fráboðan (designering) frá danska forsætismálaráðnum tann 7. mai 1985. Allur útsynningsparturin liggur uttan fyri 200 fjórðingar og er grundaður á, at Rockall háslættin verður hildin at vera natúrligt framhald av Føroyum.* Kelda: Matrikulstovan.




*Føroyar eru ikki einasta landið, ið kannar sær Rockall háslættan. Tað sama gera Ísland, Bretland og Írland.* Kelda: Jarðfrøðisavnið.

fiskimarkinum, at fyrstu royndirnar vórðu gjørdar av suðuramerikanskum londum, sum royndu at víðka sjóøkið til 200 fjórðingar. Hetta vildu stóru sjóferðslutjóðirnar ikki góðtaka, og tað sama gjørdi seg galdandi fyri lond við herskipaflota.

Landgrunnurin kom sostatt undir løgdømi strandalanda sum *siðvenjurættur*. Seinni varð rættarstøðan sáttmálafest og nágreind, tá *landgrunssáttmálin* frá 29. apríl 1958 varð samtyktur í Geneve. Reglurnar um landgrunnin eru seinni endurtiknar og smávegis broyttar í ST *havrættarsáttmálanum* frá 1982.

## Rættindi strandalandsins á landgrunninum

Landgrunssáttmálin og havrættarsáttmálin staðfesta, at strandalond hava *yvirvaldsrættindi* yvir landgrunninum, tá ræður um leiting eftir og gagnnýtslu av náttúruríkidøminum. Talan er um einkarættindi soleiðis at skilja, at hóast strandalandið ikki leitar eftir ella gagnnýtir náttúruríkidømi, kann eingin annar gera tað uttan staðiligt samtykki frá strandalandinum. Strandalandið kann við egnari lóggávu gera av, hvussu leiting og gagnnýtsla av náttúruríkidøminum skal fara fram. Tað samsvarar sostatt við havrættin, tá nýggja føroyska oljulóggávan ásetir, at kolvetni hoyra Føroyum til, og at forkanningar, leiting og framleiðsla krevja loyvi sambært reglunum í kolvetnislógini.

Tað eigur at verða havt í huga, at náttúruríkidømið, ið altjóða rættur gevur strandalandinum, ikki bara fevnir um olju, gass og annað *ikki-livandi* tilfeingi, men eisini um ávís djórasløg. Danska týðingin av havrættarsáttmálanum orðar tað soleiðis: *»De i dette kapitel nævnte naturlige ressourcer består af .... (samt) levende organismer, som tilhører sedentære arter, dvs. at de, når de er fangstmodne, enten er fastsiddende på eller under havbunden, eller er ude af stand til at bevæge sig uden at være i stadig fysisk berøring med havbunden eller undergrunden«.* Allýsingin hevur givið trupulleikar, tí hon er ikki heilt eintýdd, t.d. var ósemja millum Frakland og Brasilia um franska hummarafiskiskapin úti fyri Brasilia. Við tað at havrættarsáttmálin frá 1982 nú loyvir londum at áseta 200 fjórðinga búskaparøki, har alt livandi og ikki-livandi tilfeingi er undir myndugleika strandalandsins, eru flestu ósemjur um, hvørji djórasløg eru fevnd av landgrunsreglunum, loystar. Tað er kortini nógvastaðni soleiðis, at jarðfrøðiligi landgrunnurin røkkur longri út enn 200 fjórðingar úr landi, og tá eru *reinu landgrunsreglurnar* galdandi.

Havrætturin loyvir strandalondum at seta upp havstøðir, t.d. boripallar til tess at fremja leiting og gagnnýtslu av tilfeinginum á landgrunninum. Strandalandið kann somuleiðis áseta trygdarøki rundan um tílíkan útbúnað og gera reglur um arbeiðsumhvørvi, trygd og tilbúgving á útbúnaðinum v.m.

Staðfestast kann, at strandalandið hevur tann myndugleika, ið er neyðugur fyri at skipa leiting og framleiðslu av olju, gassi, steinsløgum v.m. á landgrunninum. Kortini er myndugleikin ikki óavmarkaður, og havrættarsáttmálin ásetir, at strandalandið skal ikki útinna síni landgrunsrættindi soleiðis, at gingið verður sigling ella rættindum hjá øðrum londum ov nær. Strandalandið kann heldur ikki nokta øðrum landi at leggja sjókaðalar og rørleiðingar eftir landgrunninum hjá strandalandinum.

Rættindini og avmarkingar í rættindunum hjá einum strandalandi eru nágreiniligari viðgjørd í frágreiðingini *"Fyrireikingar til oljuleiting"*, ið Oljuráðleggingarnevndin gav út í 1997.

## Víddin á landgrunninum

Landgrunssáttmálin frá 1958 ásetir, at strandalandið hevur yvirvaldsrættindi yvir landgrunninum út á 200 metra dypi, ella so langt havdýpið loyvir gagnnýtslu av náttúruríkidøminum á og í havbotninum.

Frá fyrsta degi varð funnist at ásetingini, sum ikki varð hildin at seta nakað ytsta mark fyri víddina á landgrunninum, tí tøkniliga menningin fór at loyva gagnnýtslu á alt størri havdýpi. Tað er eitt sindur ivasamt, um kritikkurin er grundaður, tí havast má í huga, at reglan í landgrunssáttmálanum hevði jarðfrøðiliga landgrunnin sum fortreyt.

Hildið kann sostatt verða uppá, at landgrunssáttmálin setir eitt ytsta mark, nevniliga har landgrunnurin endar. Trupulleikin við ásetingini í sáttmálanum er heldur, at hon einki sigur um, *hvar* landgrunnurin endar. Havrættarsáttmálin frá 1982 tekur tí spurningin um ytstamark landgrunsins upp. Grein 76 í havrættarsáttmálanum gevur øllum londum - sama um tey hava jarðfrøðiligan landgrunn ella ei - rætt til tilfeingið í undirgrundini út á 200 fjórðingar úr landi. Harafturat eigur strandalandið, um talan er um *natúrligt framhald* av landøkinum út um 200 fjórðingar, rætt til landgrunn, ið røkkur kantinum av meginlandsrondini. Avgjørt ytstamark fyri landgrunnin er eftir sáttmálanum annaðhvørt 350 fjórðingar úr landi (grundlinjunum) ella ein linja, ið gongur í

## ST havrættarsáttmálin frá 1982:

# Grein 76

# Allýsing av landgrunninum

1. En kyststats kontinentalsokkel omfatter havbunden i de undersøiske områder, der i hele den naturlige forlængelse af dens landterritorium strækker sig ud over søterritoriet, til yderkanten af kontinentalmargenen, eller til en afstand af 200 sømil fra de basislinier, hvorfra bredden af søterritoriet måles, i tilfælde hvor kontinentalmargenens yderkant ikke strækker sig ud hertil.

2. En kyststats kontinentalsokkel må ikke strække sig ud over de grænser, der er fastsat i stk. 4-6.

3. Kontinentalmargenen omfatter den undersøiske forlængelse af kyststatens landmassiv og består af den til soklen, skråningen og hævningen hørende havbund og undergrund. Den omfatter ikke dybhavsbunden med dens undersøiske bjergkæder eller dens undergrund.

4. a) For så vidt angår denne konvention skal kyststaten fastsætte kontinentalmargenens yderkant overalt, hvor margenen strækker sig ud over 200 sømil fra de basislinier, hvorfra bredden af søterritoriet måles, ved enten:
   i) en linie trukket i overensstemmelse med stk. 7 på grundlag af de yderste faste punkter, i hvilke tykkelsen af faste sedimenter er mindst 1 procent af den korteste afstand fra et sådant punkt til foden af kontinentalskråningen; eller
   ii) en linie trukket i overensstemmelse med stk. 7 på grundlag af faste punkter, som er beliggende højst 60 sømil fra foden af kontinentalskråningen.

   b) Såfremt andet ikke kan godtgøres, skal foden af kontinentalskråningen fastsættes som det punkt, hvor der er den største ændring i hældningsgraden ved skråningens basis.

5. De faste punkter omfattende linien for kontinentalsoklens yderpunkter på havbunden draget i overensstemmelse med pkt. 4, litra a), i) og ii), skal enten ikke ligge mere end 350 sømil fra de basislinier, hvorfra bredden af søterritoriet måles, eller skal ikke ligge mere end 100 sømil fra 2.500 meter-isobathen, som er en linie, der forbinder dybder på 2.500 meter.

6. Uanset stk. 5 må kontinentalsoklens ydergrænser på undersøiske bjergkæder ikke være mere end 350 sømil fra de basislinier, hvorfra bredden af søterritoriet måles. Dette stk. finder ikke anvendelse på undersøiske hævninger, som er naturlige bestanddele af kontinentalmargenen, såsom dens plateauer, forhøjninger, højderygge, banker og udløbere.

7. Kyststaten skal drage de ydre grænser for sin kontinentalsokkel, hvor denne sokkel strækker sig ud over 200 sømil fra de basislinier, hvorfra bredden af søterritoriet måles, ved hjælp af rette linier med en længde på højst 60 sømil, og som forbinder faste punkter, fastlagt ved hjælp af bredde- og længdegradskoordinater.

8. Oplysninger om grænserne for den del af kontinentalsoklen, der strækker sig ud over 200 sømil fra de basislinier, hvorfra bredden af søterritoriet måles, skal af kyststaten forelægges for Kommissionen for Kontinentalsoklens Grænser nedsat i henhold til bilag II på grundlag af ligelig geografisk repræsentation. Kommissionen skal fremsætte henstillinger til kyststaterne om anliggender vedrørende fastlæggelse af de ydre grænser for deres kontinentalsokkel. Grænserne for soklen fastlagt af en kyststat på grund af disse henstillinger er endelige og bindende.

9. Kyststaten skal hos De Forenede Nationers generalsekretær deponere søkort og relevante oplysninger, herunder geodætisk datum, som permanent beskriver de ydre grænser for dens kontinentalsokkel. Generalsekretæren skal sørge for behørig offentliggørelse af disse dokumenter.

10. Bestemmelserne i denne artikel berører ikke spørgsmålet om afgrænsning af kontinentalsoklen mellem stater med kyster, der ligger over for eller grænser op til hinanden.




## *Libya og Malta 1985*

Libya og Malta gjørdu í felag av at leggja málið um landgrunsmarkið millum londini fyri altjóða dómstólin í Haag. Malta, men ikki Libya, hevði góðtikið landgrunssáttmálan frá 1958. Partarnir vóru tí samdir um, at ósemjan mátti loysast eftir vanligum fólkarætti, t.e. siðvenjurætti.

Málskrav og málsgrundir
*Libya:* Landgrunsmarkið eigur at verða sett eftir rættvísum grundreglum, og leggjast má serliga upp fyri, at Libya hevur munandi longri strond enn Malta (lutfall 1:8).
*Malta:* Miðlinjan er rættvís í førum, tá lond liggja yvir av hvørjum øðrum (opposite coasts).

Úrskurðurin
Dómstólurin byrjaði við eini fyribils ásettari miðlinju, tí talan var um lond, ið lógu yvir av hvørjum øðrum. Samstundis ger dómstólurin vart við, at hesin framferðarhátturin er ikki kravdur, og at tað viðhvørt er óhóskandi at byrja við miðlinju. Nakrar málsgrundir vórðu ikki hildnar at hava stórvegis týdning, m.a. búskapar- og trygdarpolitiskar grundgevingar og landastødd. Hinvegin segði dómstólurin skapið á strondini og stóra strandalongdarmunin hava týdning, t.e. hetta eru viðkomandi umstøður, ið dentur skuldi leggjast á. Maltesiska strondin er undir 40 km, meðan viðkomandi parturin av Libya var yvir 300 km. Fyribils ásetta miðlinjan (tann við brotastrikum) máti tí rættast til fyrimunar fyri Libya. Miðlinjan varð ikki flutt samsvarandi lutfalsliga muninum í strandalongd. Fjarstøðan millum Libya og Malta er 195 fjórðingar, og varð miðlinjan flutt 18 fjórðingar, t.e. 9,2 % av fjarstøðuni.

mesta lagi 100 fjórðingar úr 2.500 metra dýpdarlinjuni.

Grein 76 í havrættarsáttmálanum verður nú hildin at spegla altjóða siðvenjurætt, tí nógv lond hava ásett víddina av sínum landgrunni samsvarandi sáttmálanum. Danmark (og harvið Føroyar) hava ikki staðfest havrættarsáttmálan, men kortini varð víddin á føroyska landgrunninum við fyribils fráboðan frá forsætismálaráðnum tann 7. mai 1985 ásett samsvarandi leiðbeiningunum í grein 76.

Lítil ivi er um, at strandalond fara at tulka grein 76 á ymiskan hátt, tí reglurnar um meginlandsrondina, ið sipa til jarðfrøðilig fyribrigdi, eru torskildar og avgjørt ikki eintýddar, sí *donsku endurgevingina*. Tað er tí skilagott, at havrættarsáttmálin setir á stovn landgrunsnevnd, ið skal geva strandalondunum ráð um, hvussu ytstamark landgrunsins verður sett.

## *Áseting av landgrunsmarki*

Tað er ikki altíð, at ytstamark landgrunsins er út móti djúphavinum. Tíðum markar landgrunnurin móti grannalandi, og tá eru sambært havrættinum aðrar reglur galdandi.

Landgrunssáttmálin frá 1958 ásetir (grein 6), at lond, ið liggja yvir av hvørjum øðrum ella marka móti hvørjum øðrum, skulu seta landgrunsmarkið við sínámillum avtalu. Eydnast tað ikki at fáa í lag avtalu, skal markið verða miðlinja, um ikki serligar umstøður krevja annað mark. Torført er nágreiniliga at siga, hvørjar serligu umstøðurnar kunnu vera, men forarbeiðini til landgrunssáttmálan geva eina ábending um, at tað serliga eru ymisk geografisk fyribrigdi, t.d. oyggjar og sker, ið kunnu orsaka frávik í miðlinjuni.

Altjóða dómstólurin í Haag tók í 1969 støðu í rættarmáli millum Danmark og Holland øðrumegin og Týskland hinumegin um landgrunsmarkið millum londini. Trupulleikin við málinum var m.a., at Týskland hevði ikki staðfest landgrunssáttmálan, soleiðis sum Danmark og Holland høvdu gjørt. Málið mátti tí loysast eftir *vanligum altjóða rætti*, t.e. siðvenjurætti, og gjørdu Danmark og Holland galdandi, at landgrunssáttmálin og miðlinjumark vóru siðvenjurættur. Somuleiðis førdu tey fram, at innskaraða týska strondin ikki var ein *serlig umstøða*, ið kravdi nakað frávik frá miðlinjuni. Týskland gjørdi hinvegin galdandi, at ásetingarnar í landgrunssáttmálanum um miðlinju ikki vóru siðvenjurættur og í øðrum lagi, at innskaraða týska strondin var ein serlig umstøða, har

miðlinjumark førdi til eina órættvísa avmarking av rætti Týsklands til landgrunnin.

Dómstólurin gjørdi tann úrskurð, at grein 6 í landgrunssáttmálanum ikki var siðvenjurættur, og tí kundi miðlinjan ikki vera galdandi aðalregla millum partarnar. Landgrunsmarkið skuldi setast við avtalu, og partarnir skuldu grunda avtaluna á rættvísar grundreglur (equitable principles). Harumframt skuldi avtalan leggja upp fyri øllum *viðkomandi umstøðum*, t.e. dentur skal leggjast á m.a. strandarskapið, serlig geografisk eyðkenni, tilfeingið á landgrunninum umframt lutfallið millum víddina á tillutaðu landgrunsøkjunum og longdina og skapið á strondini. Við støði í úrskurðinum eydnaðist tað í 1971 pørtunum at avtala landgrunsmarkið.

Norðsjóvardómurin hevur ofta verið hildin at avsiga miðlinjuna sum mark. Hetta er kortini ivasamt, um ein hevur í huga, at miðlinjan, soleiðis sum grein 6 í landgrunssáttmálanum umrøður hana, kemur í aðru røð. Høvuðsreglan er, at grannalond skulu avtala landgrunsmarkið. Ta rættarstøðuna heldur altjóða dómstólurin eisini fast um, sjálvt um grundarlagið er vanligur fólkarættur og ikki grein 6 í landgrunssáttmálanum.

Landgrunssáttmálin frá 1958 hevur ikki miðlinjuna sum avgjørda aðalreglu. Miðlinjan er útgangsstøðið, um pørtunum ikki eydnast at avtala landgrunsmarkið, og sjálvt tá verður (reina) miðlinjan avmarkað til tey føri, har ongar serligar umstøður gera seg galdandi. Hetta er helst avleiðing av, at tað á havrættarráðstevnuni í 1958 vóru lond, sum ikki treytaleyst vildu góðtaka miðlinjuna sum aðalreglu, tá landgrunsmark verður sett. Tað skilst á Norðsjóvardóminum, at *viðkomandi umstøður* eftir vanligum fólkarætti er víðari fyribrigdi enn *serligar umstøður* eftir grein 6 í landgrunssáttmálanum.

At tað eru ymiskar áskoðanir um aðalreglurnar fyri setan av landgrunsmarki, og nú eisini búskapar- og fiskimarki, er enn sjónligari í havrættarsáttmálanum frá 1982. Sáttmálin sigur í grein 83 um landgrunsmark, at lond, ið liggja yvirav hvørjum øðrum ella marka móti hvørjum øðrum, skulu seta mark sambært avtalu grundaða á altjóðarætt sum ásett í grein 38 í viðtøkunum hjá Altjóða Dómstólinum, við tí endamáli at fáa eina rættvísa loysn (*equitable solution*) burturúr. Grein 38 í viðtøkunum hjá dómstólinum er í roynd og veru ikki annað enn eitt yvirlit yvir rættarkeldurnar til altjóðarætt, og neyvan er ivi um, at grein 83 er neyðsemju-




## *Jan Mayen-dómurin 1993*

Málið kom fyri altjóða dómstólin, tá ið Danmark stevndi Noreg. Bæði londini høvdu góðkent landgrunssáttmálan frá 1958, men rættarmálið snúði seg um bæði landgruns- og fiskimarkið í økinum millum Grønland og Jan Mayen.

**Málskrav og málsgrundir**

*Danmark*: Grønland eigur rætt til fullar 200 fjórðinga landgrunn og fiskimark móti Jan Mayen (sjálvt um fjarstøðan millum Grønland og Jan Mayen bara er umleið 260 fjórðingar). Í øðrum lagi varð dómstólurin biðin um at seta felags landgruns- og fiskimark grundað á vanligan fólkarætt, t.e. siðvenjurætt. Danmark legði dent á strandarlongdarmunin

(lutfall 1:9), umframt at einki fólk búði á Jan Mayen, og at har var einki búskaparligt virksemi.
*Noreg*: Miðlinju grundaða á grein 6 í landgrunssáttmálanum og á vanligan fólkarætt.

## Úrskurðurin

Dómstólurin sigur, at landgruns- og fiskimarkið eru tvey sjálvstøðug mørk, men kortini eru tey samanfallandi. Landgrunsmarkið varð sett eftir grein 6 í landgrunssáttmálanum og fiskimarkið eftir vanligum fólkarætti.

Við tað, at talan er um tvey lond, ið liggja yvir av hvørjum øðrum, byrjar dómstólurin eisini í hesum førinum við eini fyribils ásettari miðlinju. Orsakað av strandalongdarmuninum verður miðlinjan síðani rættað til fyrimunar fyri Grønland, t.e. miðlinjan verður flutt upp til 25 fjórðingar ella 9,6% av fjarstøðuni millum londini. Rættingin verður framd við at býta umstrídda økið upp í 3 partar, m.a. fyri at tryggja báðum pørtum atgongd til lodnuna, ið ferðast í syðsta parti av økinum (N-M). Dómstólurin legði ongan dent á fólkatalið og vantandi búskaparliga virksemið. Samstundis ger dómstólurin vart við, at miðlinjan verður ikki flutt støddfrøðiliga eftir strandalongdarmuninum.

loysn millum miðlinjulondini og tey, ið vildu seta landgrunsmark eftir øðrum aðalreglum.

Nakrir úrskurðir eru seinastu 20 árini gjørdir um landgruns- og búskaparmark, og kann tað tykjast, sum um úrskurðirnir royna at tulka aðalreglurnar fyri markaseting soleiðis, at tað í ávísan mun rennur saman millum reglurnar í landgrunssáttmálanum, havrættarsáttmálanum og vanliga siðvenjurættinum. Úrskurðurin í rættarmálinum millum Danmark og Noreg (vegna Grønland og Jan Mayen) sýnir, at góðar grundir kunnu vera fyri hesum, tí samstundis sum grein 6 í landgrunssáttmálanum var galdandi, mátti dómstólurin brúka vanligan fólkarætt, tá fiskimarkið skuldi setast. Tá partarnir høvdu biðið um, at landgruns- og fiskimarkið skuldi verða tað sama, var dómstólurin noyddur at "assimilera" reglurnar, m.a. við at javnseta *serligu umstøðurnar* eftir grein 6 í landgrunssáttmálanum við *viðkomandi umstøðurnar* eftir vanligum altjóða rætti. Hetta heldur dómstólurin heldur ikki vera undarligt, tí í báðum førum er talan um, at reglurnar hava sum mál at náa einum rættvísum ella rímiligum úrsliti. ■

## *Altjóða pinkulandaráðstevna '99*

Í døgunum 26. til 29. apríl verður ráðstevna um sjálvstýrisøki og pinkustatir í Norðurlandahúsinum í Havn. Á enskum hevur ráðstevnan fingið heitið MicroStates '99 og evnið *"Globalization and Constitutionalism - Challenges to Selfgovernment and Microstates"*.

Ráðstevnan skal viðgera avbjóðingarnar, sum globaliseringsmeldurin setur til stýrisskipanirnar hjá pinkutjóðum og sjálvstýrisøkjum fyri framhaldandi at kunna mennast búskaparliga, politiskt og mentunarliga.

Fróðskaparsetrið skipar saman við Norðurlandahúsinum fyri ráðstevnuni, sum landsstýrið stuðlar fíggjarliga.

Innbodnir høvuðsrøðarar eru Pertti J. Anttonen úr Finlandi, Martin Paldam úr Danmark, Godfrey Baldacchino frá Malta og Barry Bartmann frá Prince Edward Island.

Evnini, teir skulu røða um, eru ávikavist
- Samleiki og tjóðarmyndan
- Pinkubúskapir og búskaparlig ósjálvstøða
- Sjálvstøðugar menningarætlanir
Stýrisskipanarlig støða og búskaparmenning.

# Fyrsta einmálsliga orðabókin á føroyskum

Føroysk orðabók er fyrsta rættiliga einmálsliga orðabók á føroyskum. Við stívliga 66.000 leitorðum á 1400 blaðsíðum er hon størsta orðabókin higartil. Hvørt leitorð hevur eina lýsing, ofta við samheitum, og bókin kann lutvíst nýtast sum samheitaorðabók. Í greinunum eru tilsamans um 70.000 dømi við tiltøkum, máliskum og orðtøkum. Upplýsingar eru um orðanýtslu, orðaflokk, bending og um framburð, tá ið hann víkur frá vanligum framburðarreglum; stílvirði og nýtsluøki eru eisini viðmerkt. Í bókini eru 230 nýteknaðar myndir, sum styðja upp undir fleiri enn 1000 orðalýsingar. Altjóða frøðiheiti eru við 1700 plantu-, fugla- og djóranøvn.

Orðabókin er úrslit av stórari verkætlan, sum Fróðskaparsetur Føroya hevur staðið fyri. Byrjað varð av álvara í 1990, og nú átta ár eftir er hon liðug. Handritið er ritstjórnað á Føroyamálsdeildini, og tí tøkniliga partinum hevur teldudeildin havt ábyrgdina av. Nútímans tøkni við sergjørdum forriti – nevndum RiSt – er nýtt í ritstjórnarstarvinum. Orðabókagrunnurin og Carlsbergfondet hava stuðlað verkætlanini fíggjarliga.

Í ritstjórnini hava verið 5 fólk: Jóhan H.W. Poulsen, professari, var aðalritstjóri. Hini í ritstjórnini vóru Marjun Simonsen, Jógvan í Lon Jacobsen, Anfinnur Johansen og Zakaris Svabo Hansen. Petur Zachariassen stóð fyri tí tekniska partinum sum verkstjóri.

Bæði gamalt og nýtt orðatilfar er í bókini, tilfar, ið er fingið úr skrivaðum og mæltum máli við mongum staðbundnum bygdamálsorðum, máliskum og orðtøkum. Nógv orð úr orðabók Svabos frá seint í 1700-árunum eru við, eins og gomul kvæðaorð. Mong vanlig talumálsorð, tøkuorð og fremmandaorð eru somuleiðis við, umframt hópin av yrkorðum við tilvísing til nýtsluøki. Orðabókin kann eisini nýtast sum rættskrivingarorðabók.

Høvuðsgrundarlagið undir ritstjórnararbeiðinum hevur verið seðlasavnið á Føroyamálsdeildini, sum rúmar o.u. 700.000 orðaseðlum, ið eru fingnir við orðtøku úr bókum og øðrum prentaðum tilfari og við uppskriftum úr talaðum máli. Harafturat er tilfar fingið úr føroysku-donsku, donsk-føroysku orðabókini og øðrum føroyskum orðabókum, ymsum orðalistum, teldutøka rættstavaranum og frá orðasavnarum annars. Norðurlendskar orðabøkur hava verið havdar til fyrimyndar. Nógvir serfrøðingar innan tey ymsu fakøkini hava verið uppi í arbeiðinum, og teirra kunnleika hevur orðabókin notið sera gott av.

Sum nakað nýtt hevur føroysk orðabók - umframt vanligar bendingarupplýsingar í greinini - eitt tal aftanvert við orðaflokkin hjá fallbendum orðum. Við hesum tali ber til - er ivi um bendingina - at sláa upp í bendingaryvirlitinum aftast í bókini og fáa bendingina hjá orðinum.

Umframt allar vanligar orðabókaupplýsingar hevur orðabókin yvirlit yvir føroyskar rættskrivingarreglur, ein dagførdan lista við góðkendum føroyskum fólkanøvnum og eitt yvirlit yvir orðabøkur og orðalistar. Aftast í útgávuni í tveimum bindum er ein bakleiðis stavraðaður orðalisti, sum kann vera hentur, tá ið leitað verður eftir orðum, sum hava sama seinna lið

Í sambandi við útgávuna av Føroyskari orðabók skipaði Landsbókasavnið fyri einari framsýning um orðabókaarbeiði við heitinum "Føroyskt orðabókastarv í 200 ár – frá Jens Chr. Svabo til Jóhan Hendrik".

Av tí at Føroysk orðabók er ein stórur biti at gloypa um hjá einstøkum ummælara, hava vit heitt á fýra ummælarar at geva okkum sínar fyrstu hugleiðingar um orðabókina o.u. ein mánað eftir at hon kom út. Ummælararnir vórðu bidnir um at ummæla við teirra egna yrki í huga, til tess at bókin kundi lýsast frá ymsum brúkarasjónarmiðum.

*Føroysk orðabók fæst í trimum útgávum: í einum bindi, sum kostar 450 kr., í tveimum bindum (A-M, N-Ø), sum til samans kosta 670 kr. og einari teldutøkari útgávu við leitiforritinum Orðaskjáttuni, sum kostar 340 kr. og kemur til várs.*



# Eingin umbering longur – ikki at duga at stava!








*Myndirnar eru frá orðabókaframsýningini, sum Landsbókasavnið skipaði fyri í sambandi við at Føroysk orðabók kom út í summar.*

*Katrin Næs, lærugreinaráðgevi í UMMS ummælir*

## Perman

Føroysku orðabøkurnar hava gjørt eitt fagurfrøðiligt risalop framá, frá ávikavist brúna, bláa og svarta haminum, til listprýddu permuna á ensku-føroysku orðabókini hjá Stiðjanum í 1993, súmbolsku permuna á donsku-føroysku orðabókini hjá Føroya Fróðskaparfelag í 1995 og so hesa nærmyndina av "gomlum" mosavaksnum gróti á permuni á Føroysku orðabókini, sum kom út 24. juli 1998.

Tað sýnist eisini, sum er onkur felagsnevnari fyri hesar tríggjar nevndu permur: kletturin og so tann blái liturin. "Kletturin" við øllum sínum hjátýdningum (eitt nú klettagrund!) ímyndar kanska føroyska málið; kletturin er mosavaksin – og slíkur vøkstur kemur ikki eftir einum degi, eins og málið heldur ikki mennist eftir einum degi. Slíkt eru tilgongdir, ið taka sína tíð. Men vit eru nú komin hagar til, at føroyska málið hevur fingið sína móðurmálsorðabók – og hevur sostatt rokkið einum ávísum (nokk so høgum) menningarstigi. Tann blái liturin gongur eisini aftur í øllum trimum permunum, tann blái liturin, sum stendur fyri tí evnisliga og sakliga. Tað er t.d. ikki av tilvild, at at kalla allar sjónvarpssendingar nýta bláa litin. Perman kann sjálvandi eisini fatast sum sjálvspeisk viðmerking til tað hugtakið, sum ungfólk nevna "grótføroyskt" – um so er, so má eg siga, at tað grótføroyska kann vera sera, sera vakurt!

## Orðalýsingar á egnum máli

"Tað hevur leingi tókst uttanhanda at fáa føroysk orð lýst bert gjøgnum annað mál", sigur ritstjórnin í formælinum. Tað má sigast at vera rættiliga varliga orðað. Lærarar og onnur síggja ferð eftir ferð hugtøk lýst við danska heitinum fyri sama fyribrigdi. Tað er jú ikki tað sama sum at lýsa tað. Júst hetta fyribrigdi haldi eg gera so stóran skaða á málsliga medvit okkara, at tað førir til málsligan sinnisklovning, soleiðis at vit at enda halda, at hugtøkini eru tað, sum tey eita á donskum, og so kunnu vit royna at finna meira ella minni hepnar týðingar á føroyskum. Viðhvørt ger hesin klovningur so nógv um seg, at vit gloyma at orða okkum á natúrligan hátt: Sum Alexandur Kristiansen tekur til í einari yrking: "Hvussu eitur framtíð á føroyskum?"

Nú er so tað gleðiliga hent, at vit hava fingið eitt amboð, sum kann hjálpa okkum í royndini at lýsa framtíðina, nevniliga soleiðis: 1. tíðin fyri framman, komandi tíð, 2. útlit fyri góðum og tryggum viðurskiftum, framtíðarvánir, og 3. við frámerkinum málfr. sagnorðasnið, ið sigur frá, at eitthvørt fer at henda seinni (í føroyskum við nútíðarsniði ella við fara+navnhátt). Við hesum orðalýsingum í huga



rullifjøl

spávøla





mugu vit siga, at sanniliga er framtíð í hesi orðabókini bæði so og so!

## Stílvirði

Eins og sagt verður frá í nýtsluleiðbeiningini fremst í bókini, er í støðum tilskilað í klombrum ymiskt, ið kann kasta ljós á orðið, um tað hoyrir til eitt nú ávíst yrkisøki, ella hvat stílvirði tað hevur. Júst hetta: hvat stílvirði tað hevur, er alneyðugt at vita hjá teimum, ið fáast við mál í sínum yrki. "Í vikuni loyvdi okkara størsta landsblað triðju síðu til pillbýtt tíðindafólk..." Soleiðis byrjar oddagreinin í Norðlýsinum 14. august 1998 – (stavivillur rættaðar). Um blaðstjórin hevði hugt í orðabókina, so hevði hann sæð, at orðið pillbýtt hevur frámerki óvand. Í listanum yvir styttingar sæst, at tað merkir óvandamál. Og óvandamál er neyvan hóskandi í oddagrein!

## Nýtsla av orðabókini

Ein eyðsýndur fyrimunur við orðabókini er møguleikin at leita eftir samheitum. At leita eftir júst tí rætta orðinum til høvið ella til variasjón. Vit kenna øll henda fábroytta skriviháttin, har somu orð, ið kunnu setast ístaðin – og sum kanska hóska betur ella eru neyvari.

## Bendingaryvirlitið

Ein nýskapan í orðabókini er bendingaryvirlitið aftan. Við øðrum orðum: nú er eingin umbering longur fyri ikki at seta -ir og -ur rætt! Tú finnur svarið soleiðis: lat okkum siga, at tú skalt skriva *duga* í nútíð, 3. pers. Nú kemur spurningurin: eitur tað dugir ella dugur? Vit sláa upp í orðabókini: duga hevur frámerki *s25*. Styttingarlistin sigur okkum, at *s* merkir sagnorð, og bendingarmynstur *25* fyri sagnorð finna vit á s. 1435: liva, livir, o.s.fr. Svarið er funnið: tað eitur dugir. Sum sagt, nú er eingin umbering longur!

Tó má sigast, at umbrótingin av bendingarmynstrunum sýnist tilvildarlig. Tað sær rættiliga løgið út at bróta um millum hvør- og hvønnfall fleirtal – sum tað er gjørt við hvørkikynsorðunum – tá einans fjórðingurin av næstu síðu er nýttur. Úr brúkarasjónarhorni er betri at hava alla bendingina á somu síðu, sjálvandi. Tað eru fleiri slík dømi í hesum partinum av orðabókini. Í aðrar mátar er bókin prentliga væl frágingin.

## C og aðrir óføroyskir bókstavir

Tá vit sláa upp á c – og q, x, w og z – fáa vit hesa upplýsing: Vanliga ikki nýttur í føroyskum! Tað tykist mær skemtiligt, at vit kortini ikki heilt sleppa undan hesum misháttu bókstøvum. Hygg bert undir *c: tóni, celcius, c-vitamin...* Eg kann heldur ikki bara mær uttan má vísa til nøvn teirra í ritstjórnini, har eru fleiri av hesum støvum umboðaðir!

## Navnalistin kann beina burtur misskiljingar

Aftast í orðabókini er hentur listi yvir fólkanøvn. Hann havi eg longu nýtt til at beina burtur mýtur um, hvat ber til, og hvat ikki ber til. Ein av mínum kenningum – ein ung genta – var rættiliga ørg inn á navnalóggávuna. »Eg kann ikki kalla pápa mín upp, um eg fái ein son«, segði hon. »So«, segði eg »passar nú tað?« »Ja, pápi mín eitur Poul...., og navnalógin sigur, at Poul skal stavast Pól.« (Vit síggja her fullkomiliga burtur frá spurninginum, um uppkallingin liggur í at nýta júst somu stavivillur, sum prestur nýtti í síni tíð.) Eg greiddi henni frá, at navnalógin sjálv sigur einki um, hvussu orð skulu stavast, men sambært lógini skal listi gerast við góðkendum nøvnum. Ynskir onkur at geva barni sínum navn, sum ikki er á listanum, kann viðkomandi søkja um tað – og umsóknin verður so viðgjørd. Vit vóru samdar um, at ikki øll nøvn skuldu vera loyvd, men var Poul loyvt? So at hyggja í orðabókina: Á listanum, sum er dagførdur 9. oktober 1997, standa bæði sniðini Pól og Poul. Har fór so handan misskiljingin!

## Eg gleði meg til fløguútgávuna

Eg keypti mær útgávuna við linari permu beinan vegin, hon kom út. Eg eri sera fegin um hana, men eg má siga, at eg gleði meg til fløguútgávuna. Bókin er rættiliga óhandug á lítla telduborðinum. Eg havi blaðað í hinari útgávuni, tí við stívari permu. Hon er lættari at fáast við, men krevur uppaftur meira pláss.

## Framtíðin

Eg havi lítið at finnast at – og nógv at brúka hesa bókina til. Og, sum sagt: framtíð er í bókini. •

**Ein eyðsýndur fyrimunur við orðabókini er møguleikin at leita eftir samheitum. At leita eftir júst tí rætta orðinum til høvið ella til variasjón**

# Hvat vænta vit okkum av eini móðurmálsorðabók?










*Anna M. Brimnes, býarbókavørður ummælir*

Skulu vit meta um, hvat vit vænta okkum av Føroysku orðabókini, móðurmálsorðabókini, er áhugavert fyrst at líta aftur um bak, tí krøvini í dag eru bundin at okkara vitan um orðabókasøguna.

## Orðabókagerð fyrr

Í 1600-árunum komu fyrstu móðurmálsorðabøkurnar. Hesar bøkur vóru tó øðrvísi enn seinni í tíðini. Við í bókina komu bert torfør og sjáldsom orð, og semja var millum teir lærdu, at slík orðabók átti at vera fyrimynd og bøta um málið: óhóskandi orð sluppu ikki upp í part. Kendur er Samuel Johnson, sum í 1755 gav út »Dictionary of the English Language«. Johnson var slóðbrótari; hann fór at nýta sitat og endurgevingar fyri at lýsa orðamerkingar og -týdningar. Johnson stríddist við kringlugreining, eins og orðabókaritstjórar gera í dag. Hann kom eitt nú fram til, at giraffur er: "An Abyssinian animal, taller than an elephant but not so thick."

Í 1800-árunum varð hálsað um. Sambært nýggju málgranskingini átti grundreglan at vera, at øll orð í málinum skuldu sleppa upp í orðabókina. Á ópartískan og ópolitiskan hátt skuldi sigast frá orðum, merkingum og týdningum. Ritstjórarnir áttu hvørki at fordøma ella døma um orðini. Í Føroyum gjørdi Jakob Jakobsen vart við seg síðst í øldini. Hann fylgdi ikki gleiðbeintur kósini, sum málgranskarar úti í Evropu høvdu sett. Jakobsen var málreinsari. Í seinru helvt av 1800-árunum var sterkt árin úr donskum máli; um føroyska málinum skuldi vera lív lagað, helt hann málreinsan vera bráðneyðuga. Av stórum týdningi er, at Jakob Jakobsen roynir at geva gomlum orðum nýggja merking. Hetta hava málgranskarar tikið upp eftir hann.

## Krøv til orðabøkur í dag

Orðabøkur eru ikki longur bert ætlaðar teimum lærdu; tær eru í dag gerandislutur og arbeiðsamboð. Fólkaskúlin, almenna útbúgvingin og krøvini um vitan gera, at hvørt mansbarn fer at hyggja í orðabókina, tá ið tørvur er á at kunna seg um orð og talu.

Vit vita og góðtaka, at slík orðabók eigur at vera normativ – fyrimynd, og at bygdamálini, orð og framburður, so statt verða við skerdan lut.

Umframt málsligar lýsingar, er eyðsæð, at orðamerkingar og -týdningar hjá nútíðarmálinum eru í bókini; somuleiðis eiga dømi við samheitum og dømi um orð brúkt í myndatalu at vera í henni. Vit vænta at síggja, hvussu orð skifta týdning í ymiskum høpum og hjá ymiskum samfelagsbólkum, til dømis orðið "brekaður". Millum børn er tað skemdarorð, og vit eiga at vera eitt sindur varin, tá ið vit nýta

tað (hesin týdningurin er ikki við í orðabókini).

Áhugavert er at fáa at vita um orðauppruna og um, hvussu merkingar og týdningar broytast við tíðini. Óheppin er eitt nú merkingin av orðinum "fríteinkjari": "1. ein, ið hevur egna áskoðan á trúarmál (ið víkur frá kirkjuligari læru)." Her átti at verið tilskilað, at henda merking er heldur avoldað. Í okkara tíð halda fólk í ymisku trúarsamkomunum seg ikki vera fríteinkjarar.

Fyri at lýsa tað, ið her er umrøtt, vænta vit at finna endurgevingar og sitat av ymiskum slag. Í formælinum verður gjørt vart við, at bókin er ein samtíðarorðabók, kanska er tí lítil dentur lagdur á at vísa broytingar og menning hjá málinum, og lítið er gjørt burtur úr søguligum upplýsingum - spell, tí ofta vekur júst hetta ans fyri orðum og máli.

## Samtíðarorðabók

Avmarkingar eru neyðugar; ein avmarking er so, at henda bókin er samtíðarorðabók. Ovarlaga í huganum liggur tá gerandismálið. Eru orð gloymd, ella hava ritstjórarnir gjørt av, at ávís orð, tíðum heldur vanlig orð, eru ikki føroysk? "Elskara" finna vit, men ikki "elskarinnu." Eins og á døgum Jakob Jakobsens skapa nýtt vinnulív og nýggj tøkni eisini nýggj orð. Hin gamli føroyski báturin er væl lýstur, men nútíðarbátar, eitt nú luftpútubátur og rasarabátur eru ikki slopnir upp í part; við eru "flogbátur" og "snarbátur", og ein katamaranur eitur "tvíkilja". Brandbil og bulldosara finna vit ikki, men "gravkúgv" og "dumpari" eru tikin við. Nógv landanøvn eru somuleiðis útihýst, t.d. Kambodja, Kuba, Argentina, men við eru "kubani" og "argentini".

Tey útihýstu orðini, tó ikki "elskarinna", eru her tikin úr bókunum, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags og Føroya Skúlabókagrunnur hava givið út. Okkurt bendir á, at Fróðskaparsetrið og Føroya skúli draga ikki somu línu. Vit vita, at skúlin hevur gjørt og ger eitt stórt arbeiði fyri at menna málið hjá børnum og ungum. Orð floyma inn yvir Føroyaland eina mest gjørnum fjølmiðlarnar; enskt heldur enn danskt tykist í dag at troka seg inn á føroyskt. Skal føroyskt halda fram at vera livandi mál, ræður um í dag meira enn nakrantíð at lofta orðum og smíða orð, ið ikki kennast gerandismálinum hjá næsta ættarliði alt ov fjar.

Væl ber til at skilja, at orð detta burturímillum, tá ið eitt slíkt megnararbeiði verður greitt úr hondum. Kortini átti ikki at verið so, at tú við hvørt heldur bókina meira bera brá av at vera ímynd um eina samtíðarorðabók heldur enn at vera ein slík í roynd og veru.

## Orðabøkur og teldu-skráseting á Býarbókasavninum

Á Býarbókasavninum er farið undir at gera eina fjølbroytta evnisorðaskrá til teldu, t.e. leitorð, so til ber at finna aftur tað, ið goymt er í telduni. Til tað krevjast navnorð - ítøkilig og óítøkilig, sum myndarliga eru ein hurð, ið letur seg upp á glopp til vitan, kunning og hugleiðingar um alskyns evni, sum finnast í bókmentum.

Føroyskt er, sum kunnugt ikki navnorðamál, og hetta kann vera ein bági í skrásetingararbeiðinum; ikki ber til at látast sum orð og hugtøk ikki eru til, tí eingi føroysk orð finnast fyri teimum, og eingi eru enn smíðað.



*telda*

Í stuttum kann sigast, at tvær skrásetingarreglur eru grundarlagið. Onnur skráseting snýr seg í stórum um vísindaliga og yrkisliga skráseting av bókmentum. Orð, ið hava eintýdda, neyva greining eiga tá at nýtast, berast kann saman við eina hugtakaorðabók. Hin skrásetingin er torførari, hon snýr seg um at skráseta tað óneyva fjølbroytnið, ið eyðkennir vanliga, natúrliga málið.

Orðasmíð hevur tíðum verið heppið, meira enn so; men trupulleiki stingur seg upp, um nýsmíðaða orðið er púra ókent millum fólk.

Av stórum áhuga eru gomul føroysk orð, ið fáa nýggja merking og nýggjan týdning. Annaðhvørt tað eru lærd ella ólærd, sum finna uppá, so er tað mangan gjørt við hugflogi og gamanslyndi.

Vit, ið skráseta, kunnu sum fólk flest illa vera móðurmálsorðabókina fyri uttan, nú ið vit eiga hana. Og enn hentari hevði hon verið, um samtíðarmálbering slapp meira upp í part, eins og nevnt er frammanfyri.

## Niðurstøða

Hvussu henda orðabókin fer at roynast, er ilt at siga. Í 1992 kom Ensk-føroysk orðabók, Stiðin gav út. Føroya Fróðskaparfelag gav út Donsk-føroysku orðabókina í 1995 og nú Føroysku orðabókina. Tað tykist, sum um tær báðar fyrru leggja seg meira upp at orðabókagrundreglunum frá 1800-árunum. Hildið verður, at tær í meira lagi lata gerandismálið sleppa framat, mong av orðunum síggjast ikki aftur í móðurmálsorðabókini.

Bøkurnar avdúka, at fólk eru ikki á einum máli um, hvat ið er føroyskt, og hvat ið er rangt og rætt mál. Væntandi er, at orðabøkurnar hjá Fróðskaparfelagnum verða nýttar javnsíðis, og tíðum fer Ensk-føroyska orðabókin eisini at vera einum til hjálpar. Endin verður kanska, at fólk fara at halda, at vit nú eiga eina móðurmálsorðabók og tríggjar samtíðarorðabøkur, tó at tvær teirra eru tvímæltar. ●

# Tølandi megi

*Jógvan Isaksen, bókmentafrøðingur og rithøvundur ummælir*

Tær farnu vikurnar havi eg lagt seinastu hond á eina bók, og í tí viðfangi havi eg brúkt nýggju orðabókina hjá Fróðskaparsetrinum so at siga frá morgni til myrkurs. Royndirnar hjá mær við »Føroysk Orðabók« eru sum heild góðar, og eg fegnist stórliga um at hava fingið hana sum hjálparamboð. Men sum vera man í so drúgvum og viðkvæmum verki er okkurt at finnast at.

Viðvíkjandi støðinum undir orðabókini vil onkur kanska vera við, at nú eitt sindur av talumáli er sloppið upp í part, so merkir tað, at hesi orð eru góðkend. Men lesur tú tann vælorðaða – og um somu tíð stirvna – inngangin hjá Jóhan Hendriki Winther Poulsen, so vendir hann sær ímóti at tílík orð verða brúkt: »Flest teirra [t.e. orð úr talumálinum] hava slíkt stílvirði, at ikki er mælandi til at nýta tey í vandaðum máli«. Tann drívandi kraftin í orðabókaarbeiðinum ávarar sostatt beinleiðis ímóti at brúka ein part av teimum orðum, sum standa í orðabókini. Ilt er at fáa aðra fatan, enn at tað ikki er við hansara góða vilja, at tey eru við.

Nógv hevur verið gjørt burturúr, at »Føroysk orðabók« skal vera samheitisorðabók, men tað er hon bara í ein vissan mun. Nakað av tí fyrsta, tú leggur til merkis sum brúkari er, at nógv av teimum orðum, sum verða nýtt til at greiða frá einum orði hava ikki sítt egna leitorð. Í øðrum førum hevur orðið egið leitorð, sum t.d. *sirkul*, har tað verður víst til *kringur*, men hyggur tú undir kringur verður orðið sirkul ikki nevnt.

Tú kundi eisini spurt ritstjórnina, hvussu tað ber til, at nýkomin útlendsk orð, sum verða brúkt umborð á skipi, sleppa upp í part, men ikki gomul og roynd filosofisk heiti; eitt nú logikkur, sum hvør krabbi brúkar, og har einki nýtiligt føroyskt hugtak finst. Eg veit væl, at onkustaðni skal tað setast eitt mark, og at øll griksk og latínsk hugtøk ikki kunnu setast í eina føroyska orðabók. Men tað er vónandi ikki so skaft, at alt, sum hevur við tosk at gera, er føroyskt, meðan tað at hugsa er óføroyskt?

Beinleiðis villum havi eg sæð lítið av, men eg kann kortini nevna, at upplýsingartíð er ikki »seinna helvt av 18. øld«, sum orðabókin vil vera við, men fevnir so nøkulunda um skeiðið frá ár 1700 til stutt fyri fronsku kollveltingina í 1789. Rættari hevði altso verið at sagt »fyrra helvt av 18. øld«, tá íð upplýsingartíðin var í vælmaktini.

Tann útgávan, eg siti við, er hon í einum bindi, og har er tað at finnast at, at perman er alt ov veik. Eftir at hava brúkt bókina í tríggjar vikur, er perman longu brotnað í fleiri støðum, og hon sær út, sum um eg havi havt hana í minst eitt ár. Eins og til dømis »The Concise Oxford Dictionary«, sum er um somu longd sum »Føroysk orðabók«, kundi hendan verið bundin inn í stíva permu.




*Tær mongu strikumyndirnar hjá Bárði Jákupssyni eiga sín lut í, at orðabókin er so átulig, sigur Jógvan Isaksen í sínum ummæli av bókini*

Hetta vóru atfinningarnar, og hóast tær fara avstað við meginpartinum av ummælinum, so rúma tær í mínum huga lítið afturímóti tí gleði tað er, at bókin er komin. »Føroysk orðabók« hevur sama eginleika ella tølandi megi sum eitt gott leksikon.

Tú fert í bókaverkið at leit eftir upplýsing um eitthvør og áðrenn tú veitst av , situ tú og lesur um alt møgulig annað, sum tú ikki visti fans Tær mongu strikumyndirna hjá Bárði Jákupssyni eig eisini sín lut í, at orðabóki er so átulig. ●



*teldustýrd snella*

# Øll skapan er frígerandi

*Hanus Andreassen, rithøvundur ummælir*

Upplýsingarsamfelagið, sum alsamt er í menning, hevur natúrliga við sær eina vaksandi orðabókaframleiðslu. Sum orð, máliskur og hugtøk úr filmi, list, politikki, tøkni o.s.fr. reka yvir um landamark, verður henda framleiðsla í mongum londum dagførd í heilum. Nakað um somu tíð sum FØROYSK ORÐABÓK – tann fyrsta føroyska móðurmálsorðabókin – kom út á føroyskum, sóu tvær dagførdar enskar orðabøkur dagsins ljós. Í eingilskum bløðum vístu ummælarar á, at teirra mál – tí tað byggir á eitt fleirmálsligt grundstøði – er lívførari enn onnur.

Sjónarmiðið er áhugavert. Fremmand ávirkan kann, alt eftir hvussu ein loftar henni, vera køvandi ella ríkandi. Føroysk orðabók ber m.a. prógv um tann ómetaliga týdning ein virkin málpolitikkur í meira enn eina øld hevur havt fyri lívførið hjá føroyskum. Øll skapan er frígerandi. So umframt tey virði henda stevna í sjálvari sær umboðar, hevur hon gjørt, at tað hevur fallið okkum lættari ikki at útihýst mongum lánorðum. Styrki hevur stórtøkni við sær.

Hetta er av sonnum ein nútíðar orðabók, við greiðum og nýtum orðalýsingum, dømum, sum vísa, hvussu málið verður brúkt, yvirliti yvir bendingarmynstur. Ikki minst fegnast ein um tær 230 myndirnar, ein ómetaliga hent hjálp hjá ungfólkum, sum nóg illa hóma bóndasamfelagið.

Hugmyndafrøðiliga speglar bókin aftur tey bæði høvuðsrákini í føroyskum málsligum starvi – tað hóvliga afturhaldið, tað skapandi framfýsnið. Hon er fermd við tí stóra tali av nýyrðum, sum eru skapt, serliga hesa seinastu hálvu øldina. Talan er um eitt ríkidømi av bendiligum og ofta snøggum orðatilfari, sum vit ikki kunnu vera fyriuttan í dag, og sum fólk og fjølmiðlar hava tikið til sín. Samstundis er mangur gestur, sum fyrr sat uttangáttar, sloppin inn aftur í varman. Bókin er sostatt eitt gott dømi um málhugmyndafrøðiliga samanrenning. Vit hóma Svabo og onnur stórmenni, sum »festu teg fyrst á blað«. Bókin endurspeglar sjónarmiðini og ber prógv um ágrýtnið hjá Jóan Hendriki W. Poulsen, professara, tí einstaklingi, sum fyrst og fremst hevur heiðurin fyri hetta stórverk. Men hon ber eisini boð um ágrýtni og mótspæl frá einum yngri ættarliði av málfólkum.



Sitandi við einum slíkum verki í fanginum, hevur ein í fyrstu syftu lítlan hug at koma við atfinningum. Men ritstjórnin biður fólk koma við uppískoytum, so eg fari at nevna nøkur púra tilvildarlig dømir. Eg sakni í bókini orðið veband. Eisini sakni eg orðið móri – svarandi til tað enska moor, soleiðis sum Shakespear brúkar tað. Jóhan Hendrik W. Poulsen gjørdi hetta orðið í 1988, og tað kom undan móðurfaldi í týðingini av »Othello«. Tað vakra navnorðið *følilsi*, sum Svabo hevur og Hammershaimb brúkar í síni grein um samljóð og misljóð, finni eg heldur ikki.

Móðurmálsorðabókin er í ein vissan mun samheitabók. Stuttligt er at sita og blaða í bókini og staðfesta, hvussu ríkt málið er á mongum økjum. Ein maður, sum bølir oman á gomlum aggi, kann vera bæði íminnin, langrøkjutur, illmintur og minningarsamur. Tað prúða blomstrið, sum í hesum døgum stendur og sveiggjar fram við Hoydalsá við víólbláum knokki, eitur bæði líragras og blákollur. Tann, sum ber eyga við kápukonuna ein jóansøkumorgun og hevur hug at bera upp bønarorð, kann eisini heilsa tí yndisligu frúnni við heitum sum ravnaleika, børkubóndi ella mariustakkur. Hvør fer at geva so orðkringum friggjara krakk?

Fyrst og fremst verður henda bókin eitt neyðugt amboð hjá øllum sum fáast við føroyskan tekst, ein stuðul hjá næmingum og lærarum, ein hjálp hjá teimum ivasomu og ókønu. Í hesum sambandi kann verða nevnt, at føroysk umseting sum heild – so ófatiligt tað kann ljóða – ikki enn er komin burtur úr lívsseigum rasshaftum. Í staðin fyri t.d. í heilum at brúka tað eitt sindur møðsama og gamalsliga orðið *júst*, kunnu vit – sum henda orðabókin ger vart við – skriva nettup ella akkurát ella beint. Í eini bók við einum yvirliti yvir sokallaðar skeivar máliskur fann eg henda setning: Uttan Janus Kamban var eingin listaskáli. Sjálvur haldi eg, at hetta neyvan sigst styttri ella betur, og orðabókin váttar tað eisini á síðu 1322, har *uttan* verður lýst sum fyrisiting.

Soleiðis kann føroysk orðabókaútgáva eisini hava við sær frælsi til at stíga út úr ósjónligum ringum. ●

# Sólarmyrking í Føroyum um nøkur ár

Tann 11. august í ár fer at bera til at síggja sólarmyrking í einum smølum belti tvørtur um Miðeuropa úr Suðuronglandi til Svartahavið. Ivaleyst fer sólarmyrkingin at merkjast nakað í Føroyum, men um nøkur ár verður tað í Føroyum møguligt at uppliva eina fullkomna sólarmyrking. 20. mars ár 2015 fara Føroyar at vera innanfyri tað øki, sum hevur fullkomna sólarmyrking. Dagsljósið hvørvir ta stuttu løtuna, tá mánin skuggar fyri sólini, og hesa løtuna fer at bera til at síggja tunnu atmosferuna um sólina, sum ikki sæst í bjarta sólarljósinum.

Kelda:Naturens Verden, nr. 1, árg. 82, 1999




# Finnlendingar áhuga fyri Føroyum.

Ein av luttakarunum á summarskeiðnum á Fróðskaparsetrinum 1998 var úr Finnlandi. Sara Nordlund



hevur skrivað um Føroyar í seinasta blaðnum frá universitetinum í Helsinki, Universitas Helsingiensis. Í greinini, sum er 4 síður við vøkrum myndum, greiðir hon frá føroyska málinum, og onkrum av teimum trupulleikum føroyska málið stendur yvir fyri.

Í næsta blað verður aftur ein grein um Føroyar, sum rithøvundurin Johan von Bonsdorff skrivar. Hann hevur nýliga verið í Føroyum í samband við at hann skal dagføra bók sína, Atlantens Cowboys, sum varð ummæl í seinasta Frøði.

Universitas Helsingiensis kemur út fýra ferðir um árið.

# Øska frá Heklu legðist á Føroyar í 1845

2. september 1845 tók Hekla at goysa og blakaði upp øsku himmalhøgt, sum vindurin bar við sær tvørturum hav til Føroyar, Hetland og Orknoyggjarnar, umframt skip, sum sigldu á leiðini hesar dagarnar. J.G.Forchhammer, professari í Keypmannahavn, skrivar í brævi frá 1845, at í Føroyum rakti øskan serliga Sandoynna og Suðuroynna, og at fólk á staðnum vóru ræðslusligin yvir døkkgráa kavan. Á Orknoyggjunum var øskukavin máldur at vera 2 til 4 mm tjúkkur.

Kelda: Náttúrufræðingurin, 68 árg, 2.hefti 1998



# Føroysk gransking fær eina saltvatnsinnspræning

Tríggjar vísindaligar verkætlanir úr Føroyum fingu granskingarstyrk frá sokallaða "35-milliónа"-grunninum hjá danska granskingarráðnum, sum íalt lótu styrk til 12 verkætlanir.

Fyrst í februar mánaða blivu tær nógv umrøddu 35 milliónir krónirnar byttar út til gransking í Føroyum, Grønlandi og Norðuratlantshavinum yvir 3 ára verkætlanir, sum bygdu m.a. á samstarv, útbúgvingarmøguleikar og á annan hátt menning av granskingini í Føroyum og Grønlandi. Verkætlanirnar skuldu halda seg innanfyri eina rakstrarjáttan millum 1 og 6 milliónir krónir.

Tær tríggjar verkætlanirnar úr Føroyum, sum fingu stuðul, vóru innan gransking av føroyskari søgu og siðsøgu, gransking av fjallavøkstri og gransking av



landslagi á landi og havi.

Ein treyt, sum danska granskingarráðið setti fyri játtaninum er, at allar verkætlanirnar leggja dent á at kunnu almenningin um granskingarúrslit. So vit kunnu vænta at hoyra meir til hesar verkætlanir bæði innanfyri 3 ára tíðarskeiðið, játtanin verður latin, og ikki minst aftaná 3 ár, tá granskingarúrslitini fyriliggja.

Nú fáa lesararnir møguleika at spyrja um eitthvørt innan vísindi og gransking. Er onkur spurningur, sum hevur stungið seg upp í sambandi við onkra grein í Frøði, ella er okkurt, sum kundi verið áhugavert at tikið upp í eini seinni grein, kann hesin teigurin kanska verða rætta staðið til hetta.

Til hesa fyrstu royndina við spurnateiginum hava vit fingið hjálp frá Armgarð Arge úr Útvarpi Føroya. Hon hevur fleiri vetrar havt sendingina *Víða um*, har tað hevur verið spurt og svarað um alt millum himmal og jørð. Sendingin er nú tikin av skránni, men nakrir spurningar lógu, sum ikki hava verið í Útvarpinum.Vit hava sett okkum fyri at fáa svarað onkrar av hesum.

Hevur tú ein spurning til Frøði ella eina áheitan um at taka upp eitthvørt vísindaligt evni, ber til at stíla hetta til:

Frøði
c/o Náttúrugripasavnið
Debesartrøð
100 Tórshavn

Sum fax: 31 84 38
ella sum teldu-post:
frodi@sleipnir.fo

# Hví melur hjólið aftureftir á filmi?

**Lesari spyr: Tá ein hyggur at hjólum, sum koyra skjótt, hví sær tað so út sum um tey mala aftureftir?**

Hans Pauli Joensen, alisfrøðingur savrar:

Í filmframvísing er myndin ikki samanhangandi, men talan er um eina røð av støkum myndum, ið koma fram við einum ávísum tíðføri. Lat okkum t.d. hugsa okkum eitt koyrandi rossavognshjól við 6 snældum í einum westernfilmi. Vinkulin millum snældurnar er 60 stig. Tað sum hevur týdning fyri hvussu vit uppfata snurrið á hjólinum er hálvi vinkulin millum snældurnar - her 30 stig. Er snúningsferðin minni enn 30 stig frá eini støk-mynd til næstu tykist hjólið at trilla frameftir. Er snúningsvinkulin millum 30 og 60 stig - also millum hálvan og heilan vinkulin millum snældurnar - í millumbilinum millum tvær myndir, tykist hjólið at mæla aftureftir. Er snúningsvinkulin millum 60 og 90 stig millum tvær fylgjandi myndir tykist hjólið at mæla frameftir.



Til tann meiri roknikøna: Um hjólið hevur N snældur er vinkulin teirra millum 360/N stig. Um hjólið millum tvær fylgjandi myndir snarar minni enn helvtina av hesum vinklinum, tvs 180/N stig, tykist hjólið at mæla "rættan" veg. Tað tykist mæla "skeivan" veg um tað melur millum 180/N og 360/N stig millum tvær fylgjandi myndir.

*Hans Pauli Joensen, alisfrøðingur, leiðari á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum*

# Máling til skip skaðar lív í sjónum

## Purpurkúvingar gerast ófruktbarir av eitrandi skipsmáling, eisini í Føroyum.



*Mynd 1: Purpurkúvingar, krækingar og fliður í Føroyum verða kannaði fyri eitran av skipsmáling.*

*Maria Dam, evnisfrøðingur, Dr.Scient, Heilsufrøðiliga Starvsstovan*

### *"Tað sum týnir lív"* –

Í nútíðar samfelag okkara nýta vit nógv evni til at beina burtur óynsktan gróður. Hesi evni vera alment nevnd biocidir, *»tað, sum týnir lív«*. Biocidini verða bólkaði eftir, hvat slag av lívi tey skulu týna. Til dømis nýta vit herbicidir til at týna plantur, fungicidir til at týna soppar, pesticidir til at týna sjúkuelvandi verur og insecticidir til at drepa lýs, flugur og onnur smákykt.

Ein partur av biocidunum virkar sum vætu- og rotverja. Vit kenna tann grøna rotverjuviðgjørda viðin, sum verður nýttur til uttandura byggjarí, eitt nú húsaklædningar, bilhús, hegn og tílíkt. Færri av okkum munnu vita, at rotverja verður nýtt til at viðgera botnin á skipum og bátum. Hetta verður gjørt fyri at fyribyrgja gróðri á skrokkinum og sostatt minka um mótburðin undir sigling.

### *Innihaldið í rotverjuni*

Mest nýtta rotverjan til viðgerð av skipsbotni er grundað á málmevnini kopar, arsen, krom og tin. Tin-organisk evni hava vakt serligan ans seinastu árini, og serliga hevur dentur verið lagdur á tributyltinevni, stutt nevnd TBT.

### *Kynsbroyting oyðir nøringarevni*

Kanningar hava víst, at sjálvt í ørsmáum nøgdum kunnu TBT-evni elva til kynsbroytingar hjá purpurkúvingi. Kynsbroytingin, sum fer fram, elvir til, at kvennsnigilin fær kallkynslim afturat sínum egnu natúrligu kynsgøgnum.

Fyribrigdið nevnist imposex, og avleiðingin

er minkandi nøringarevni. Í ytsta føri missur kúvingurin evnini at nørast og djóraslagið hvørvur úr økinum.

## *Hvar eru tey dálkaðu umhvørvini?*

Sniglar, sum eru skaddir av TBT-dálking og hava útviklað imposex, eru at finna í teim størru havnaøkjunum rundan um Norðsjógvin, í Írska havinum, í Ermasundi og í Skagerak. Skaddar gággur koma ikki bert fyri við havnaløg og bátahyljar, men eru eisini at finna undir skipsleiðum í Norðsjónum, har imposex hjá agngággu *(Buccinum undatum)* er ávíst.

Fyribrigdið imposex er eisini staðfest í Hetlandi, Íslandi, á Svalbard og í Alaska.

## *Nýtslan av TBT verður tálmað nakað*

Mett er, at nýtslan av tinorganiskum evni í Noregi í 1995 var umleið 33 tons í 1995 (SFT, 1994), og av hesum var umleið helvtin TBT-rotverja. Í Danmark finna vit heimsins næststørsta skipsmálingavirki, og her er árliga nýtslan av TBT-rotverju umleið 40 tons. Nýtslan av TBT-rotverju um allan heim er umleið 3000 tons um árið.

Lond um allan heim eru farin at tálma nýtsluna av TBT-rotverju við at seta bann fyri nýtslu av teim vandamiklu evnunum til bátar styttri enn 25 metrar. Krøv um avmarkaða nýtslu vórðu sett í verk í Fraklandi í 1982, og eftir fáum árum valdu Ongland, USA, Nýsæland, Australia og Noreg at taka undir. Í 1990/91 bleiv í Danmark bann sett fyri at nýta TBT-ríka máling á skip minni enn 25 m.

## *Fleiri djórasløg longu dálkað*

Tað vóru stóru matgerðarmeistararnir í Evropa, sum matgera við froskum, sniglum, skeljum og øðrum góðum úr havinum, sum fyrst gjørdust varug við, at okkurt løgið var við at henda. Seinast í 70-talinum varnaðust fólk á ostruvirkjunum við Arcachon buktina, at skeljarnar *(Crassostra gigas)* høvdu "skeivt" skap. Í 1982 kom á prent fyrsta frágreiðingin um sambandið millum TBT og avskeplaðar skeljar.

Seinni er vorðið greitt, at fleiri sløg av skeljum og sniglum eru ávirkaði av TBT-evnum, men neyvan er nakar so meint raktur sum purpurkúvingur (*Nucella lapillus*).

## *Imposex verður nú kannað Føroyum*

Í 1996 stílaði Heilsufrøðiliga Starvsstova fyri innsavnan av purpurkúvingum, kræklingum og fliðum í fjøruni ymsastaðni í Føroyum. Innsavningarstøðini eru víst á mynd 2. Skeljadjórini vórðu send til kanningar á Norsk Institutt for Vannforskning.




*Mynd 2: Purpurkúvingar, kræklingar og fliður úr 6 ymiskum støðum í Føroyum eru kannað.*

Úrslitini av kanningunum vísa, at imposex er at finna í fimm av seks kannaðum purpurkúvinga stovnum. Tað einasta staðið, har eingir honsniglar høvdu kallkynsgøgn var í Kirkjubø. Øll hini støðini vóru kvennkynsgøgnini so ávirkaði av TBT-eitran, at onkur man hava verið ófruktbarur.

Samstundis sum kynsgøgnini vóru kannaði vóru eisini gjørdar evnafrøðiligar kanningar av tin-organiskum evnum í purpurkúvingum, kræklingi og fliðum. Hesi kanningarúrslit vísa, at tað var nógv mest av tinorganiskum evnum í fjørðuni í Tórshavn, og at hetta var tað einasta plássið har hesi evni kundu ávísast í fliðum. Samanberingin millum tær tríggjar fjøruverur-

## Tað hjálpir at seta bann

Í 1996 varð almannakunngjørd ein stór bretsk kanning av purpurkúvingum í Bretlandi, Skotlandi, Hetlandi og Noregi. Ætlanin við kanningini var at staðfesta um minkingin í nýtsluni av TBT til skipsmáling hevur havt nakra ávirkan á títtleikan av imposex hjá sniglunum. Purpurkúvingar vóru innsavnaðir á teimum støðum, har granskarar áður høvdu staðfest imposex. Á fleiri av støðunum livdu ikki purpurkúvingar longur. Úrslitini sum heild, har purpurkúvingar framvegis vóru at finna, bendu tó á, at støðan var í bata. Norsk kanningarúrslit av imposex hjá purpurkúvingum, heintað frá ávísum støðum somu tíð á árinum, benda á somu niðurstøðu.

nar vísir, at kræklingur tekur í seg nógv størri nøgd av eitrinum, enn purpurkúvingur og fliða, men at árinini, tað, vit vita um, síggjast fyrst í purpurkúvingi.

Í sambandi við innsavningina varð tó lagt til merkis, at tað var ikki sørt av eggum til, og tað var eisini fitt av kúvingi. Hetta bendir á, at purpurkúvingar neyvan verða oyddir í næstum, hóast einstakir sniglar eru ófruktbarir.

Vágiligt man tykjast at halda uppá, at stovnurin ikki er hóttur, tá hesar kanningarnar prógva, at eitranin er farin at tarna nøringini. Tað, sum gevur orsøk til eitt sindur av bjartskygni er, at TBT-eitranin er kend um allan heim, og ymisk tiltøk eru sett í verk fyri at basa dálkingini. Eitt nýtt slag av botnviðgerðarevni er komið á marknaðin, og nýtslan av TBT-ríkari máling verður skamtað. Fleiri vísindalig skriv eru almannakunngjørd í nitiárunum, har víst verður á, at støðan er batnað munandi. Vert er tó at leggja merki til, at tann seinasta kanningin, sum varð almannakunngjørd í Stóra Bretlandi í oktober 1998, vísti, at hóast nýtslan av TBT-ríkari máling bleiv skamtað fyri 8 árum síðan, og sostatt átti at vera munandi minkað, so er framvegis vanligt, at kvennsniglar nærhendis havnaøkjum eru ávirkaðir av eitran.

Eingin serlig orsøk tykist tí at halda, at støðan fer at batna munandi fyrr enn fullkomiligt bann verður sett fyri nýtslu av TBT-ríkari máling.

Meir kann lesast um kanningarnar í grein hjá høvundanum í Fróðskaparriti nr. 46, 1998.



*Myndin er úr Suðuroy. Tilvildarliga vald.*

Dorete Bloch, lívfrøðingur, PhD, Føroya Náttúrugripasavn:

# 10 tey bestu tølini fyri grindadráp



*Tað verður tosað um grindaloysi, tær størstu grindirnar, tyfusgrindina og 4 grindir sama dag,* ***men nær var tað nú, tað var?*** *Tað fært tú at vita á teimum næstu síðunum. Eisini fært tú at vita nøkur miðaltøl fyri grindadráp.*

Hagtøl fyri grindadráp í Føroyum: s. 27-31

## Miðaltøl fyri grindadráp 1709-1997

| | Øll árini íroknað | Bara grindaár |
|---|---|---|
| Tal av árum | 289 | 245 |
| Tal av grindum hvørt ár | 6,1 | 7,1 |
| Tal av hvalum hvørt ár | 847,8 | 1000,0 |
| Tal av hvalum í hvørjari grind | 140,0 | 140,0 |

# Nær kemur fyrsta grindin á árinum?

Grind kann koma allar mánaðir á árinum. Talvan vísir 1752 grindir frá 1709-1997 býtt á mánaðirnar í árinum; í mars hava verið fæst grindir, meðan flestar hava verið í august.

Onkur ár hevur verið neyðugt at bíða leingi eftir fyrstu grindini, men hvussu leingi? Ársins fyrsta grind er oftast komin í juli, men trý ár er fyrsta grindin ikki komin fyrr enn í desember, nevniliga í 1770, 1787 og í 1797. Trý ár, í 1793, 1798 og í 1925, kom fyrsta grindin í novemb-er, og í 1868 kom tann fyrsta í okt-ober. Tann fyrsta grindin í 1998 kom í juli, og hetta er hent 39 ferðir fyrr í tíðarskeiðnum 1709-1997.







# Tey bestu grindaárini

Tíggju tey bestu grindaárini hava sjálvsagt verið í tíðarskeiðum við nógvum grindum, t.e. mitt í øldunum, í hesari og í farnu øld. Tað er galdandi bæði fyri talið av dripnum grindum, men eisini fyri nøgdina av hvalum í hvørjari grind. Tað er eyðsýnt, at 1980'ini eru millum tey bestu grindaárini yvirhøvur.

### Bestu grindaárini

| Ár nr. | Ár | Tal av grindum |
|---|---|---|
| 1 | 1941 | 27 |
| 2 | 1984 | 21 |
| 3 | 1985 | 20 |
| 4 | 1986 | 20 |
| 5 | 1988 | 19 |
| 6 | 1843 | 19 |
| 7 | 1981 | 19 |
| 8 | 1987 | 19 |
| 9 | 1961 | 18 |
| 10 | 1968 | 18 |

### Bestu hvalaárini

| Ár nr. | Ár | Tal av hvalum |
|---|---|---|
| 1 | 1941 | 4.448 |
| 2 | 1939 | 3.362 |
| 3 | 1843 | 3.142 |
| 4 | 1981 | 2.973 |
| 5 | 1940 | 2.853 |
| 6 | 1951 | 2.835 |
| 7 | 1980 | 2.775 |
| 8 | 1847 | 2.675 |
| 9 | 1982 | 2.652 |
| 10 | 1958 | 2.619 |

# Hvussu leingi hevur verið grindaloysi?

Grindahagtølini vísa, at grindadráp koma í aldum við umleið 110-120 árum millum hvønn kamb, og umleið 50 ár forskotið av kambinum, er aftur líka leingi millum hvønn aldudalin. Kambarnir hava verið umleið 1710-1730, 1830-1850 og seinast umleið 1935, meðan tíðarskeiðini við grindaloysi hava ligið 1750-1795, 1890-1930 og nú er líkt til, at næsta tíðarskeiðið nærkast. Skal spáast um grindadráp í framtíðini, átti næsti kamburin at verið her umleið ár 2020-2030.

# Seinastu árini við grindaloysi

Hagtølini vísa, at vit skulu heilt aftur til 1927 at finna tað seinasta árið uttan nakað grindadráp. So nærkast vit aftureftir tí síðsta aldudalinum á grindakurvuni, soleiðis at tað í árunum 1924, 1901, 1891 og 1890 heldur eingin grind var. Í restini av 1800 talinum var grind, tí undanfarna árið við grindaloysi var í 1795. Sostatt hava tað bara verið tvey ár við grindaloysi í 19. øld, 1890, og 1891, meðan tað higartil hava verið trý ár við grindaloysi í 20. øld, 1901, 1924 og 1927.

# Sjálvt á teimum bestu hvalvágunum eru nógv ár við grindaloysi

Tað verður ofta sagt, at á summum hvalvágum eru tað bara nøkur fá, avgomul fólk, sum minnast, hvussu ein eigur at bera seg at í grindadrápi. Men eisini á teimum tíggju oftast nýttu grindavágunum gjøgnum tíðirnar, har 78,5% av øllum grindum (82,7% av øllum grindahvalum) eru dripnar, hava fleiri ár verið uttan grindadráp. Í talvuni er gjørt upp, hvussu nógvar grindir og hvussu nógvir hvalir samanlagt eru dripin á hesum hvalvágum í tíðarskeiðnum 1584-1996. Serliga miðjan á 18. øld hevur verið ein soltin grindatíð.

**Bestu hvalvágirnar og ár við grindaloysi**

| Hvalvág | Grindir íalt | Grindir % | Hvalir íalt | Hvalir % | Ár við grindaloysi tal | Ár við grindaloysi skeið |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Miðvágur | 254 | 15,2 | 45.219 | 18,4 | 27:<br>9: | 1749-1775<br>1783-1791 |
| Klaksvík | 212 | 12,7 | 37.307 | 15,2 | 23:<br>17: | 1783-1791<br>1753-1770 |
| Hvalvík | 163 | 9,8 | 31.483 | 12,8 | 21:<br>15: | 1755-1780<br>1782-1796 |
| Vágur | 146 | 8,8 | 20.779 | 8,4 | 54:<br>10: | 1742-1795<br>1926-1935 |
| Vestmanna | 138 | 8,3 | 19.587 | 8,0 | 70:<br>11: | 1732-1801<br>1820-1830 |
| Hvalba | 124 | 7,4 | 17.070 | 6,9 | 45:<br>11: | 1748-1792<br>1921-1931 |
| Tórshavn | 99 | 5,9 | 13.142 | 5,3 | 94:<br>33: | 1728-1821<br>1897-1929 |
| Hvannasund | 75 | 4,5 | 7.761 | 3,2 | 61:<br>20: | 1733-1803<br>1859-1878 |
| Trongisvágur | 50 | 3,0 | 6.441 | 2,6 | 71:<br>24: | 1733-1803<br>1875-1898 |
| Funningsfjørður | 47 | 2,8 | 4.825 | 2,0 | 68:<br>27: | 1735-1802<br>1899-1925 |



# Størstu grindirnar

Støddin á grindunum spennir frá einum hvali til, ja hvussu nógvar? Her er topp-tíggju listin yvir tær grindirnar, har vit bæði kenna dagin fyri drápið og vita, at talan bert er um eina grind. Serliga Klaksvík er væl fyri á hesum yvirlitinum.

**Størstu grindirnar**

| Dagfesting | Hvalvág | Hvalir | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|
| 6. okt. 1940 | Sandur | 1.200 | Konfirmatiónsgrindin |
| 20. okt. 1879 | Vestmanna | 900 | |
| 22. nov. 1872 | Klaksvík | 856 | |
| 20. okt. 1938 | Hvalba | 854 | |
| 27. juli 1852 | Klaksvík | 852 | |
| 11. juni 1931 | Klaksvík | 820 | |
| 7. juli 1939 | Klaksvík | 800 | |
| 9. aug. 1899 | Miðvágur | 726 | |
| 18. apríl 1932 | Hvalvík | 675 | |
| 16. aug. 1898 | Klaksvík | 661 | |



# Fleiri grindir sama dag

Síðani 29. november 1803 kenna vit við vissu dagin fyri 1.357 av 1.417 grindadrápum, sum tilsamans hava fevnt um 200.196 hval. Flestu grindirnar eru komnar einsamallar, men 59 ferðir hava tvær grindir verið sama dag. Bara eina ferð hava fýra grindir verið sama dag, nevniliga:

Tríggjar grindir sama dag er komið fyri tríggjar ferðir:

**Tríggjar grindir sama dag**

**23. juli 1941 løgdu 334 hval beinini í hesum hvalvágum**

| | |
|---|---|
| Vágur | 55 hval |
| Tvøroyri | 29 hval |
| Húsavík | 250 hval |

**23. juli 1968 løgdu 287 hval beinini í hesum hvalvágum**

| | |
|---|---|
| Tórshavn | 81 hval |
| Sandur | 69 hval |
| Fámjin | 137 hval |

**27. juni 1985 løgdu 399 hval beinini í hesum hvalvágum**

| | |
|---|---|
| Klaksvík | 151 hval |
| Sandur | 109 hval |
| Fámjin | 137 hval |



# Fleiri grindir sama dag í árinum

Hagtølini um grind siga eisini frá nøkrum døgum, tað er serliga vandamikið at vera hvalur her um leiðir. 365/366 dagar eru í árinum; av teimum eru 69 dagar, grind ikki verið hildin til, og hinvegin eru tveir dagar har grindadráp hevur verið heilar 17 ferðir. Til dømis hevur ongin grind verið skotdagin 29. februar, meðan tvær grindir hava verið jólaaftan og fýra tollaksmessudag, seinast í 1987. Í Ólavsøkuvikuni hava 11 grindir verið Ólavsøkuaftan, 28. juli, og 14 Ólavsøkudag, 29. juli. Niðanfyri er yvirlit yvir teir dagar í árinum, sum gjøgnum tíðirnar, t.v.s. aftur til 1803, flest grindir hava verið dripnar.

Tað er ikki løgið, at teir dagarnir oftast hevur verið hildið til liggja í juli og august, tí 63,5% av øllum grindum verða dripnar í hesum báðum mánaðunum.

### Fleiri grindir sama dag á árinum

| Tal av grindum | Dagur á árinum |
|---|---|
| 17 | 9. august |
| 17 | 19. august |
| 16 | 12. august |
| 16 | 16. august |
| 16 | 23. juli |
| 15 | 1. august |
| 15 | 3. august |
| 15 | 7. august |
| 15 | 8. august |
| 15 | 22. august |
| 15 | 23. august |
| 15 | 31. juli |

### Fleiri grindir sama dag

**16. juli 1992 løgdu 657 hval beinini í fýra hvalvágum**

| | |
|---|---|
| Bøur | 62 hval |
| Vestmanna | 55 hval |
| Miðvágur | 199 hval |
| Leynar | 341 hval |












# Hvussu nógv er fingið burtur úr drápunum?

Fólkatalið vaks frá umleið 5.000 fólkum, tá langfarafiskiskapurin byrjaði, og meira peningur kom í umfar. Fólkatalið kom upp í umleið 48.000 í 1980unum, men liggur í dag um 45.000.

Í tíðarskeiðnum 1709-1997 hava verið 1795 grindadráp við tilsamans 250.899 hvalum. Harumframt vita vit um 43 grindir afturat við 5.433 hvalum í tíðarskeiðnum frá 1584-1708. Frá Gablatíðini 1648-1708 finnast nærum ongi grindahagtøl. Yvirlitið yvir grindahvalaveiðuna sær soleiðis út:

### Nøvn á grindum

| Navn | Hvalvág | Dagfesting | Hvalir |
|---|---|---|---|
| *Grindin mikla* | Vágur | Juli 1741 | 1.025 |
| *Skaðagrindin* | Sandvík | 13. feb. 1915 | 210 |
| *Ódnargrindin* | Hvalba | 28. nov. 1916 | 127 |
| *Meslingagrindin* | Norðragøtu | 27. nov. 1935 | 170 |
| *Tyfusgrindin* | Klaksvík | 9. juli 1938 | 209 |
| *Konfirmatiónsgrindin* | Sandur | 6. okt. 1940 | 1.200 |

### Miðal lívsparametur hjá grind

| Miðal | Bæði kyn | Kalldýr | Kvenndýr |
|---|---|---|---|
| *Aldur* | 14,6 ± 0,2 ár | 14,6 ± 0,2 ár | 14,6 ± 0,2 ár |
| *Longd í cm* | 401 ± 1,8 cm | 420 ± 3,3 cm | 387 ± 1,8 cm |
| *Vekt* | 783 ± 17,7 kg | 879 ± 38,0 kg | 721 ± 14,9 kg |
| *Skinn* | 6,3 ± 0,0 skinn | 9,4 ± 0,01 skinn | 5,4 ± 0,0 skinn |

# Onkrar grindir hava fingið navn

Fleiri grindir hava fingið navn eftir onkrum serligum, sum hevur eyðkent júst hetta drápið. Tað kann vera veðrið (óðnargrindin), aðrar hendingar samstundis (konfirmatiónsgrindin), at fólk eru smittað við sjúku av grindamonnunum uttanífrá (meslingagrindin) ella av viðurskiftunum á staðnum (tyfusgrindin).

# Miðaltølini fyri grindahval eru hesi:

Við eini miðalvekt uppá 783 kg, harav 54% verða etin, og við støði í omanfyrinevndu fólkatals- og grindadrápstalvum, ber til at rokna árligu úrtøkuna av grindaveiðu fyri hvønn føroying út. Hetta eru sjálvandi bara leiðbeinandi tøl, men tey geva eina ábending um, hvønn týdning grindadráp hevur havt gjøgnum øldirnar. Tó vita vit frá keldunum, at í miðjuni av 18. og 19. øld varð avlopsgrindin latin neytunum til matna.

## *Loysing ella ikki*

Búskaparligur myndil kannar avleiðingarnar av fullveldinum.





## *Føroyski havhesturin*

Havhesturin er nýggjur búfuglur í Føroyum, – vit kaga inn í heimin hjá hesum áhugaverda og vælsmakkandi nýinnflytara okkara. Hvussu stórur gerst hann, hvussu gamal, hvar býr og ferðast hann, og nógv annað verður nomið við.

# *Úr innihaldinum í næsta Frøði*




## *Havbotnurin – úr Føroyum til Grønlands*

Áløgan á havbotninum sigur frá, hvat er hent í havøkinum langt aftur í tíðina. Hendingar, so sum eldgos ella víttfevnandi veðurlagsbroytingar kunnu avlesast av tilfarinum á havbotninum.